| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>2. mai 2013 | Blað nr.:<br>10434 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 2. mai 2013 kl. 17.00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 58/13-88/13**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Bjørghild Djurhuus
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**64/13** **2013-0175**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 2. mai 2013:** Tikið til eftirtektar.

**65/13** **2013-0143**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 2. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

**66/13** **2013-0945**

**Ársroknskapurin fyri 2012 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt góðkendur.

**67/13** **2013-0917**

**Uppskot til roknskapin 2012 hjá Tórshavnar havn**

Roknskapurin 2012 hjá Tórshavnar havn varð framlagdur.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Nevndin góðkendi roknskapin og samtykti og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt góðkendur.

**68/13** **<u>2013-0921</u>**

**<u>Grannskoðanarfrágreiðing 2012 hjá Tórshavnar havn</u>**

Grannskoðanarfrágreiðing 2012 hjá Tórshavnar havn varð framløgd.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Tikin til eftirtektar og beind í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna grannskoðanarfrágreiðingina.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt góðkend.

**69/13** **<u>2013-0955</u>**

**<u>Fundarskipan fyri fíggjarnevndina</u>**

**Fundarskipan fyri fíggjarnevnina**
**(NEVNDARARBEIÐI)**

**MANNING OG MÁLSØKI**
**§ 1**

**<u>1. petti</u>.** Í kommunustýrisskipanini eru reglur um manning og málsøki fíggjarnevndarinnar ásettar í 4. parti, greinunum 14 til og við 19, og reglur um íleggingararbeiði ásettar í 3. parti, 11. grein, og eru tær endurgivnar aftast.

**FUNDIR FÍGGJARNEVNDARINNAR**
**§ 2**

**<u>1. petti</u>.** Fundir nevndarinnar eru fyri afturlatnum hurðum.

**§ 3**

**<u>1. petti</u>.** Á fyrsta nevndarfundi í valskeiðinum skipar nevndin seg við næstformanni. Fyri at val av næstformanni skal verða bindandi krevst, at nevndin er fullmannað.

**§ 4**

**1. petti.** Á seinasta vanliga nevndarfundi í álmanakkaárinum ásetur nevndin, nær vanligir fundir verða í komandi ári, og hvar hesir verða hildnir.
**2. petti.** Heldur nevndarformaðurin ella ein meiriluti av nevndarlimum tað vera neyðugt, verður boðað til eykafundar í nevndini.

§ 5

**1. petti.** Nevndarlimir hava skyldu at møta á nevndarfundum. Ber ikki til hjá limi at koma á fund, boðar hann formanninum frá, áðrenn fundurin byrjar. Nevndarformaðurin ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.
**2. petti.** Nevndarformaðurin kann geva øðrum persóni - umframt kommunustjóra og/ella fundarskrivara - atgongd, um tað er ynskiligt til tess at fáa meira at vita um málið.
Stjórarnir hava atgongd eftir tørvi.
**3. petti.** Á hvørjum fundi verður skrivað í gerðabókina, hvørjir limir ikki vóru til staðar, og nær limir koma.
**4. petti.** Noyðist limur at fara av fundi, skal hann boða formanninum frá, og verður ført í gerðabókina, nær limur fer.

**FUNDARSKRÁ**
§ 6

**1. petti.** Nevndarformaðurin skipar fyri, at fundarskrá verður send limunum í seinasta lagi 3 dagar frammanundan, at vanligur fundur skal verða. Formaðurin fyrireikar fundin.
**2. petti.** Um nevndarlimur í seinasta lagi 8 dagar framman undan vanligum fundi skrivliga hevur biðið um viðgerð av einum máli, setir nevndarformaðurin hetta mál á skránna.

§ 7

**1. petti.** Tá eitt mál er sett á fundarskránna til ein vanligan fund, skal hetta lýsast í stuttum, styðjað við møguligum tilmæli. Neyðugt tilfar, sum greiðir nærri frá málinum, skal - um slíkt ikki longu er sent limunum - vera til taks á býráðsskrivstovuni minst 3 gerandisdagar framman undan fundinum. Eitt yvirlit yvir málini skal samstundis vera til skjals.
**2. petti.** Trúnaðartilfar, sum sent er limum saman við fundarskrá ella flýggjað út á fundi, skal latast inn aftur eftir nýtslu.
**3. petti.** Samstundis sum boðað verður til eykafundir í nevndini, letur nevndarformaðurin í so stóran mun sum gjørligt nevndarlimirnar vita, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum.
**4. petti.** Nevndarlimur, ið hevur tørv á at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til kommunustjóran.

**VIÐTØKUFØRI**

**§ 8**

**1. petti.** Nevndin er viðtøkufør, tá ið í minsta lagi 3 av nevndarlimunum eru á fundi.

## FUNDARLEIÐSLA
**§ 9**

**1. petti.** Nevndarformaðurin, og um honum berst frá, varanevndarformaðurin leiðir fundirnar, stýrir orðaskiftinum og ansar eftir, at fundirnir fara sømiliga fram. Hann leggur fram fundarskrá og ger av, hvussu teir spurningar, atkvøtt verður um, skulu verða orðaðir.
**2. petti.** Limirnir eiga at lýða avgerðir formansins, tá ið tað snýr seg um at halda neyðugt fundarskil. Er limur 2 ferðir á sama fundi biðin um at fara siðiliga fram, kann formaðurin nokta honum at fáa orðið aftur á fundinum.
**3. petti.** Um so er, at limur ikki ger eftir boðum formansins, tá ið hann hevur tikið orðið frá honum, ella óskil kemur í, kann formaðurin leggja niður fundin, ella um neyðugt slíta fundin.
**4. petti.** Uppskot, sum koma fram undir orðaskiftinum, verða latin formanninum.

## FRAMLØGA AV MÁLUM
**§ 10**

**1. petti.** Nevndarformaðurin ger av, í hvørji raðfylgju málini koma til viðgerðar, og hann kann víkja frá raðfylgjuni á fundarskránni.

## GEGNI
**§ 11**

**1. petti.** Um viðurskiftini eru so, at ivi kann vera um gegni (habilitetin) hjá einum limi, skal hann siga formanninum frá hesum. Eisini kann ein limur reisa spurningin um gegni hjá øðrum limi.
**2. petti.** Nevndin ger av við atkvøðugreiðslu, um eitt mál er slíkt áhugamál hjá einum limi, at hann ikki eigur at taka lut í málsviðgerðini. Um so er, at nevndin ger av, at limur er ógegnigur, skal limurin fara av fundinum, meðan málið verður viðgjørt og avgreitt. Limur kann tó vera við at viðgera egnað gegnið. Tiltakslimur hjá nevndarlimi eigur at fáa fundarboð, um nevndarlimur gerst ógegnigur.
**3. petti.** Hevur tiltakslimur ikki fingið fundarboð í tí føri, nevndin ger av, at limur er ógegnigur, kann málið verða flutt til næsta fund, uttan so at 3 av teimum møttu nevndarlimunum eru ímóti, ella um málið ikki tolir at bíða.

## ATKVØÐUGREISLA
**broytingar- og eykabroytingaruppskot**
**§ 12**

Nevndarlimir kunnu bert taka lut í atkvøðugreiðslum nevndarinnar, um teir persónliga eru til staðar, meðan hesar fara fram.

**§ 13**

**1. petti.** Atkvøðugreiðsla fer fram við at rætta hondina upp. Er atkvøðugreiðslan eftir formansins tykki ógreið, letur hann nevndina atkvøða av nýggjum.
**2. petti.** Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeirluta, um ikki annað er fyriskipað í lóggávuni. Eitt uppskot er samtykt, tá fleiri atkvøður eru fyri enn ímóti. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er uppskotið fallið.
**3. petti.** Heldur formaðurin, at allir limir eru samdir, kann hann gera kunnugt, at málið er samtykt uttan atkvøðugreiðslu. Mælir limur tá í somu løtu ímóti, verður tó vanlig atkvøðugreiðsla.
**4. petti.** Nevndarlimur kann ikki sleppa sær undan ábyrgd við ikki at greiða atkvøðu.
**5. petti.** Avgerð, sum nevndin hevur tikið, kann ikki á sama fundi verða broytt, uttan so at allir limir, ið vóru á fundi, tá avgerðin varð tikin, eru samdir um hetta.
**6. petti.** Nevndarlimur kann sambært § 32 í kommunustýrislógini, áðrenn ein nevndaravgerð verður sett í verk, krevja, at málið verður lagt fyri býráðið til avgerðar.

**GERÐABÓKIN (O.A.)**
**§ 14**

**1. petti.** Avgerðir nevndarinnar verða á fundinum skrivaðar í gerðabókina av fundarskrivaranum. Formaðurin sigur, hvat skrivast skal.
**2. petti.** Limur kann krevja sína serstøðu í stuttum skrivaða í gerðabókina. Snýr tað seg um mál, ið skulu sendast til annan myndugleika, kann hann eisini krevja, at myndugleikin verður kunnaður um, hvat skrivað er í gerðabókina.
**3. petti.** Formaðurin ansar eftir, at allar nevndarsamtyktir verða førdar í gerðabókina, og at henda nágreiniliga endurgevur, hvussu atkvøðugreiðslan í hvørjum máli sær fór fram og lýsir hvørjir limir, ið atkvøddu fyri ella ímóti ella ikki greiddu atkvøðu.
**4. petti.** Tá fundur er lokin, verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av nevndarlimunum, sum hava verið á fundinum. Limirnir kunnu ikki við at vísa til atkvøðugreiðslu sína ella av øðrum orsøkum bera seg undan at skriva undir gerðabókina.

**VIÐVÍKJANDI FATAN AV HESI FUNDARSKIPAN**
**§ 15**

Limir hava skyldu til at halda seg til avgerð formansins viðvíkjandi spurningum um, hvussu tað, ið ásett er í hesi fundarskipan, skal skiljast. Málið kann tó leggjast fyri nevndina á næsta fundi.

**FUNDARSKIPANIN**
**§ 16**

**1. petti.** Henda fundarskipan kemur í gildi beinanvegin, hon er góðkend av býráðnum.
**2. petti.** Broytingar og ískoyti til hesa fundarskipan kunnu tó verða góðkend av nevndini, uttan at málið verður lagt fyri býráðið aftur, sbr. § 29, stk. 3 í kommunustýrislógini.
**Sambært § 1, 1. petti:**

**4. partur í kommunustýrisskipanini**
**Fíggjarnevndin**
**§ 14**

**1. petti.** Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir.

Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sum løgd eru til hana sambært kapittul 8 í kommunustýrislógini.

**2. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Fíggjarviðurskifti
2. Starvsfólkaviðurskifti
3. Ognir kommununar
4. Leigumál
5. Sløkkiliðið
6. Kommunuplanur
7. Yvirskipað mál sum framtíðar orku, bústaðarfígging, gransking v.m.

**3. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi burturleigu av ognum í minni enn fimm ár. Nevndin sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meira enn fimm ár av ognum kommununnar.

**4. petti.** Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu – áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar – hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini.

**§ 15**

**1. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar – íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum – verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær.

**2. petti.** Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í peningastovn, á postgirokonto ella settar í slík lánsbrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum.

**3. petti.** Virðisbrøv kommununnar skulu – um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt – fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki býráðsins. Um tað er møguligt, skal átekningin verða skrivað í bók hjá avvarðandi stovni.

**4. petti.** Somu skyldur, sum frammanfyri eru tilskilaðar, hevur fíggjarnevndin viðvíkjandi øðrum peningaognum, sum kommunan hevur um hendur.

**§ 16**

**1. petti.** Fyri 1. oktober sendir fíggjarnevndin býráðnum uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

**2. petti.** Uppskot til ársfíggjarætlan skal viðgerast tvær ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Ársfíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember og latin landsstýrismanninum innan 3 gerandisdagar aftaná.

**3. petti.** Við hvørjari upphædd á uppskotinum skal verða viðmerkt:

1) tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár.
2) tann upphædd, ið er avsett fyri verandi roknskaparár, og
3) tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í undanfarna roknskaparári.

Um roknskapurin fyri undanfarna ár ikki er lagdur fram, kunnu fyribils tøl úr honum verða nýtt.

**4. petti.** Tær íleggingar- og fíggjarætlanir, ið nevndin hevur gjørt, verða lagdar fram saman við uppskotinum til ársfíggjarætlanina. Við uppskotinum skulu eisini fylgja upplýsingar um tær fíggjarligu broytingar, sum kunnu væntast í komandi roknskaparári.

**§ 17**

Fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av:

1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini,
4) at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar, og
5) at leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar.

**§ 18**

Fíggjarnevndarformaðurin ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir ella samtyktu eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2.
petti.

**§ 19**

**1. petti.** Fíggjarnevndin hevur eftirlit við fyrisitingini av peningi og bókhaldi kommununnar. Hon ansar eftir, at inntøkurnar hjá kommununi koma inn rættstundis, og at møgulig útistandandi skuld verður innkravd. Eisini ansar nevndin eftir, at eftirstøðulistar verða gjørdir og kannar hesar við hóskandi millumbili.

**2. petti.** Fíggjarnevndin ásetur tær reglur, sum kommunala umsitingin hevur at ganga eftir, tá ið tað snýr seg um at siga nevndini frá, um tað í nøkrum føri er farið – ella kann væntast at verða farið – upp um tær einstøku peningaupphæddir á ársfíggjarætlanini ella tær upphæddir, ið játtaðar eru sambært eykajáttan.

**3. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at øll onnur skjøl verða goymd á tryggan hátt.

**<u>Úr 3. parti í kommunustýrisskipanini</u>**
**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um teknisku nevndina og fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna uppskotið til fundarskipan.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt góðkend.

**70/13** **2005-1183**

**Reinsaríið í Tórsgøtu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til undanfarna samtykt í málinum, har játtaðar eru kr. 450.000 til kanningar og ráðgeving at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu, hevur arbeiðið higartil leitt fram til, at mælt verður til at broyta leist fyri hetta arbeiðið.

Orsøkin er, at kanningarnar av bygninginum hava víst, at umvælingararbeiðið í stóran mun best kann skipast sum smáar einkult standandi arbeiðstøkur, sum noyðast at fremjast í stigum fyri at kunna taka støðu til, hvussu farast skal víðari fram. Hetta er serstakliga grundað á, at talan er um ein gamlan bygning, sum fyrst hevur havt nógva og skiftandi nýtslu, og síðan hevur staðið tómur. Hetta hevur havt sína ávirkan á týðandi bygningslutir, og neyðugt er sostatt at bróta niður partar fyri at fáa eina hylling á, hvussu farast skal víðari fram.

Tá talan er um slíkt arbeiði, sum nærum kann samanberast við restaureringsarbeiði, verður ofta mett, at tað er sera óheppið at binda seg til eina høvuðsentreprisu í sáttmála. Vandi er fyri at koma í ta støðu, at eitt av arbeiðinum avdúkar so týðandi trupulleikar, at neyðugt kann verða við munandi fleiri pengum fyri at fremja lidnu loysnina eftir avtaluni, sum er sáttmálabundin. Og tá hevur byggiharrin ringar møguleikar at annaðhvørt steðga á ella skifta loysn uttan stórar eykakostnaðir.

Skotið verður tí upp at brúka annan leist, at samlaða íløgujáttanin, ið eftir er kr. 1.050.000, verður játtað til verkætlanina, og at bjóða arbeiðið út í smærri arbeiðstøkur sum undirhondsboð, so hvørt sum ein arbeiðstøka er avklárað.

Kostnaðarmeting fyri fyrsta umbyggingarstig verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.050.000 av kontu 5376, L53002 Reinsaríið stigvis umbygging, og at einstøku arbeiðstøkurnar verður bodnar út sum undirhondsboð.

**Mentamálanevndin 9. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Á fundi við Tórshavnar kommunu 16. november 2011 vísti Felagið MenTón á vantandi tónleikaumstøður í Havn, og ynski varð sett fram um, at Reinsaríið í Tórsgøtu verður spælistað. Teirra meting er, at tann núverandi ætlanin ikki er nøktandi til teirra virksemi. Í hesum sambandi er neyðugt at kanna, um til ber at laga verkætlanina til tørvin hjá tónleikarunum, herundir ljóðviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 75.000 av kontu 5366 Stuðul annars til at kanna, hvussu bygningurin best verður lagaður til tørvin hjá tónleikinum.

**Mentamálanevndin 30. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Mikael Viderø, býararkitektur, varð biðin um at kanna um Reinsaríið eisini kann brúkast til rytmiskt spælistað.

Kontrast Arkitektar hevur gjørt nýtt uppskot av Reinsarínum.

Í nýggja uppskotinum, januar 2012, verður m.a. sagt:

" Reinsaríið verður í dag eina mest nýtt til konsertir. Uppruna uppskotið var, at húsið skuldi nýtast til fleiri ymisk endamál, til tónleikaframførslur, almen tiltøk, bókakafe, uppihaldsstað fyri ungdómar á útferð, herundir dag- og frítíðarstovnar. Tað hevur verið eitt ynski, at broyta ætlanina, soleiðis at møguleiki er at brúka húsið til rytmiskt spælistað. Tískil eru ávísar broytingar gjørdar í mun til fyrra uppskotið. Meira luft er nú millum hæddirnar fyri at økja um rúmd (volumen). Men annars er tankin tann sami, við einum gjøgnumgangandi multifunktionaliteti.

Byggilistarliga hugskotið byggir uppá, at samantvinna tað gamla við nakað nýtt. Innan verður tað gamla varðveitt, sum er merkisvert í sær sjálvum, og við nýggjari innrætting og nútíðar sniði fæst ein meira tíðarhóskandi og nýtiligur bygningur. Hugskotið byggir eisini uppá at fáa ein polyvalentan bygning, sum við sínum mongu tiltøkum kann broyta funktión eftir tørvi. Hetta, at hava rúmini so opin sum møguligt og funktiónirnar mobilar. Rýmingartrappa í norðurskjøldrinum er eisini hugsað sum brúkstrappa.

Veghæddin skal kunna nýtast til rytmiskan tónleik, men eisini er møguleiki fyri øðrum framførslum. Pallurin verður í vestursíðuni á fyrstu hædd, við sitiplássum kring pallin, samstundis sum sitipláss verða kring opið á aðru hædd."

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at arbeiða víðari eftir uppskotinum frá januar 2012, til eisini at gera Reinsaríið til eitt rytmiskt spælistað og samstundis varðveita multifunktionalitetin.

Á íløguætlanini 2012 konto 5375 eru avsettar 1 mió. kr.

Mælt verður til at játta 1 mió. kr. av íløgum 2012 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Mentamálanevndin 11. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina partin um peningajáttina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2012 konto 5375 til at arbeiða víðari í sambandi við liðugtgerð av Reinsarínum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi viðmerkingum frá húsaumsitingini og byggideildini hevur Kontrast tillagað uppskotið frá januar 2012, har dentur varð lagdur á at fáa viðurskifti í lagi í sambandi við bruna, funktión, kloakk, umhvørvi, trygd, lyftu, rørslutarnað o.a.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, har samlaði kostnaðurin nú er mettur til 6,8 mió. kr. við mvg.

Ætlanin hevur verið at gera arbeiðið í stigum og í fyrsta umfari at fremja kjallarahæddina og miðhæddina. Hesin partur er mettur at kosta 3,5 mió kr. við mvg.

Á kontu 5375 L53002 eru 2,1 mió kr. tøkar til endamálið. Á íløguætlanini fyri 2013 konta 5375 eru avsettar 3 mió kr. aftrat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3 mió. kr. av íløgukontu 5375 til kontu 5375 L53002 Reinsaríið til at arbeiða víðari við liðugtgerðini.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og harumframt til at mæla býráðnum til at játta 2 mió. kr. afturat til liðugtgerð, ið verður at fíggja soleiðis: kr. 1.660.000 av konto 5375 Skálatrøð og kr. 340.000 av konto 5175 Musikkskúlin. Játtanin upp á 2 mió. kr. til liðugtgerð er treytað av undirtøku frá mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 20. mars 2013:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndar-samtyktini 13. mars 2013.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**71/13** **2011-2166 TÍH/BJ**

**Kampingplássið Yviri við Strond**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Útvegan og uppsetan av nýggjum bygningum til kampingvirksemi og tænastur til ferðafólk.

Verandi kampingpláss varð sett á stovn í 1980-81. Kampingskúrarnir til W.C. og baðirúm. Hetta vórðu byggiskúrar sum byggifelagið Guttesen og Staksberg tá bygdu. Síðani er bygdur ein skúrur aftrat til konufólk og køk, matgerð og matstovu. Húsini ella skúrarnir eru nú millum 30 og 20 ára gamlir, og hóast gott viðlíkahald eru teir ikki tíðarhóskandi og krevja størri og størri umvælingar. Ikki er sørt at vitjandi úr útlondum viðmerkja, at umstøðurnar eru vánaligar.

Tórshavnar kommuna eigur økið matr. nr. 672a, samlað vídd á matrikli 27505 m²
Byggisamtykt D1.

Tekningar eru við fasadum og innrætting hevur býararkitekturin latið gera. Bygningurin er staðsettur á sama øki sum verandi. Tað er tað besta, havandi friðingarmynduleikan í huga. Ætlan er at keypa lidnar pavilliongir. Nýggjur rottangi skal setast upp og bindast í skipaða kloakk í vegnum.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 3,0 mió á kto 6275 Fríðkan av kommununi, harav umsitingin í sambandi við framløguna av fíggjarætlanaruppskotinum mælti til at nýta kr. 1,0 mió til nýggjar bygningar á staðnum. Ein neyvari meting sigur tó, at kostnaðurin fyri nýggjar bygningar og kloakk-/rottangaviðurskifti, væntast at kosta uml. 1,5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at taka undir við uppskotinum, og at játta kr. 1,5 mió av kto 6275 til nýggjar bygningar og broyting av rottanga v.m. á kampingplássinum Yviri við Strond, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jògvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Vísandi til at kampingplássið liggur í D1, hevur ivamál stungið seg upp, um loyvi at gera broytingar og byggja nýtt. Verandi bygningar eru 30 og 20 ára gamlir og í ringum standi. Byggiloyvi krevst til dagføring av krøvum, plásskrøv, rýmingarleiðum, avlamisviðurskiftum, atkomu fyri rullistólabrúkarum v.m. Neyðugt verður at ríva verandi hús niður og at byggja nýtt. ì hesum sambandi verður samlaða húsavíddin 140 m² móti verandi 72 m².

Arbeitt hevur verið við at skipa eitt kampingpláss á øðrum staði, men er henda íløgan so stór, at einki verður gjørt fyribils. Tí verður søkt um at fáa fyribilsloyvi og frávik frá byggisamtyktini til at byggja nýtt. Bygt verður sambært hjáløgdu tekningum.

Væntað verður, at tað kann nøkta tørvin í eitt 10 ára skeið til 2023.
Loyvi krevst frá náttúrufriðingarmyndugleikunum um bygging nær sjóvarmálan.

Tá nýggjur skúrur varð bygdur aftrat i 1986, vóru loyvi fingin til vega frá Náttúrufriðingarnevndini og frá Yvirfriðingarnevndini dagfest 22. august 1986. Býráðsmál nr. 34/7 1981.

Umsitingin hevur eisini arbeitt víðari við tekningum av byggingini, og hevur gjørt nakrar broytingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi prosjekt, og at játta byggiloyvi sum frávik, sambært innsendu tekningum, treytað av góðkenning frá friðingarmyndugleikunum.

Somuleiðis verður mælt til at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í innbodnari arbeiðstøku.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av at bygningurin verður fluttur minst 2,5 m frá vegnum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen, timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð, timburmeistari eru bodnir til undirhondsboð. Tilboðini verða handað Tórshavnar kommunu tann 25. februar 2013, og verða løgd fram til nevndarfundin.

Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Friðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu hevur á fundi hin 7. jan. 2013 givið játtandi loyvi til byggingina, treytað av góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini.

Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 19. febr. 2013 staðfest avgerðina hjá Friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Byggiloyvi er síðani útskrivað hin 25. febr. 2013.

Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð timburmeistari vóru bodnir at lata inn undirhondsboð. Tilboðini vórðu handað Tórshavnar Kommunu tann 25. februar 2013.

Tilboðið frá Djóna í Geil Johansen er áljóðandi: 2,098,737,00 kr uttan mvg.

Tilboðið frá Valbjørn Dalsgarð er áljóðandi: 3.833.687,00 kr uttan mvg.

Um tikið verður av lægsta tilboðnum, verður samlaði kostnaðurin fyri Kampingplássið Yviri við Strond áljóðandi: **2.831.983,00 kr**, íroknað óvæntað, eftirlit, og 6,25% í mvg.

Avsettar eru kr. 1,5 mió. á fíggjarætlanini fyri 2012 til verkætlanina. Írestandi fíggjartørvurin er sostatt áljóðandi: **1.331.983,00 kr.**

Spurningurin um hvørjir møguleikar eru at útvega írestandi fíggingina er viðgjørdur av stjórnini, saman við Fíggjardeildini, og verður víst á henda møguleika:

| | | |
|---|---|---|
| FÆ 2012 til kampingpláss | konto 6275, L62005 | 1.500.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Boðanesgjógv mentanarøki | konto 5375 | 1.000.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Skálatrøð framtíðarætlan | konto 5375 | 340.000 |
| | | **2.840.000** |

Viðv. tíðarætlan hava báðir tilboðsgevarar upplýst, at byggingin væntast at taka umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at spurningurin um fígging, herundir írestandi fíggingina, verður tikin upp til politiska viðgerð, og at málið verður beint til mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, mælir frá at finna írestandi fíggingina á mentanarøkinum.

**Ískoyti:**
Stjórnin hevur kannað møguleikarnar nærri, fyri fígging av írestandi fíggjartørvinum, eftir at staðfest er, at konto 6275 hevur eitt avlop á kr. 800.000.

Á hesum grundarlagið mælir stjórnin til, at samlað fíggingin fyri kampingplássið verður sett soleiðis saman, at tekniska økið fíggjar kr. 2.300.000, meðan restin – kr. 540.000 verður fíggjað við flyting av óbrúktum játtanum á konto 5375:

| | | |
|---|---|---|
| FÆ 2012 til kampingpláss | konto 6275, L62005 | 1.500.000 |
| Framflyting av avlopi frá FÆ2012 Friðkan av býnum | konto 6275 | 800.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Boðanesgjógv mentanarøki | konto 5375 | 200.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Skálatrøð framtíðarætlan | konto 5375 | 340.000 |
| | | **2.840.000** |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til, at fíggja samlaða kostnaðin fyri kampingplássið Yviri við Strond sambært omanfyri standandi uppskotið.

**Tekniska nevnd 13. mars 2013**
Limirnir hava umvegis teldupost hesa støðu til tilmæli:
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, tekur undir vid tilmælinum, treytað av, at peningurin verður fluttur aftur til mentamálaøkið, tá tørvur verður á tí.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til, at málið kemur fyri á eyka fundi í teknisku nevnd 18. mars 2013.

**Mentamálanevndin 13. mars 2013**
Limirnir hava umvegis teldupost hesa støðu til tilmæli:
Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Jógvan Arge, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, tekur undir vid tilmælinum, treytað av, at peningurin verður fluttur aftur til mentamalaøkið, tá tørvur verður á tí.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanendini og teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

72/13 **2013-0506 HN**

**Gongubreytir á Frælsinum breiðkast til gongu- og súkklubreytir**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við ynski um súkklubreytir í kommununi, verða gongubreytirnar á Frælsinum uppstigaðar til gongu- og súkklubreytir, sambært tekning 2013-0506/2.

**Fíggjarligt:**
Arbeiðið er mett at kosta kr. 1.000.000,- íroknað 6,25% mvg. Sí annars j. nr.: 2012-0506/3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at:

1. farið verður undir at gera omanfyri standandi arbeiðir, fíggjað av íløgum 2013, deild 8175, súkklubreytir,
2. játtað avsettu kr. 1,0 mió. til endamálið
3. beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. mars 2013:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Í sambandi við breidd av koyribreyt vísir nýggja almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu til m.a. vejsektoren.dk. Sambært vejsektoren.dk, er normal breidd á koyribreyt, útroknað út frá vanligari ferðslu á vegi til 50 km/t, sett til 3,25 m, tó kann vegleiðandi minsta breidd setast til 3,00 m. Koyribreytin á Frælsinum verður sett 3,25 m.

**Býráðið 2. mai 2013:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Greiddu ikki atkvøðu**:** Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurdsson.

**73/13** **2013-0487 KF**

**Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 80 í Kollafirði.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Umsókn frá Mariu Jacobsen vegna eigararnar av ognini matr. nr. 80 í Kollafirði, um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 80, Kollafjørð og loyvi til sundurbýti av ognini til 5 grundstykkir til raðhús.

Í fyrstu atløgu er tað bert umsóknin um broyting av byggisamtyktini sum verður viðgjørd.

Ognin, sum liggur við Sjógv – yvirav Missiónshúsinum, er 2652 $m^2$ til støddar og er sambært almennu byggisamtyktini partur av C1-miðstaðabygging t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt. Tað er sostatt ikki loyvt at byggja sethús á ognini í dag.

C1-øki er góðar 5000 $m^2$ til støddar og liggur báðu megin vegin við Sjógv. Eystaru megin vegin liggur Missiónshúsið á matr. nr. 160, sum er 770 $m^2$ og partur av matr. nr 107a, uml. 1000 $m^2$ til støddar , sum Føroya Jarðargrunnur eigur. Vestaru megin vegin liggur partur av matr. nr. 158, sum er sethús og matr. nr. 80 við einum ástandandi sethúsi.

Í gomlu byggisamtyktini fyri Kollafjørð var hetta økið A- miðstaðarbygging, við somu ásetingum, sum C1 hevur fyri núverandi byggisamtykt.

Býarskipanardeildin kennir ikki til nakrar ætlanir um miðstaðarbygging á økinum.

Av tí at tað tykist so trupult at fáa fatur á lendi til bústaðarendamál, metir býarskipanardeildin at kommunan eigur at hyggja positivt upp á umsóknir av hesum slagi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini á møti og broyta byggisamtyktina fyri økið vestan fyri vegin við Sjógv frá C1 øki til A1 øki.

**Kollafjarðanevndin 19. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.
Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**74/13** **2013-0842 KF**

**Uppskot til broyting av serstøku byggisamtykt nr. 7, við Óðinshædd**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyrispurningur er komin frá Búðstaðir um loyvi til bygging av leiguíbúðum á matr. nr. 1318a (3518 $m^2$) og 1319b (1994 $m^2$) við Óðinshædd.

Hetta økið er A2-sethúsaøki í serstøku byggisamtykt nr. 7. Sambært serstøku byggisamtykt nr. 7, skulu *"eindirnar ikki verða nýttar uttan til sethús og bygd mugu verða einans stakhús, ið standa fyri seg"*.

Í serstøku byggisamtykt nr. 7 eru umráðispartar B ætlaðir til tvíhús, raðhús ella teimum líkir bústaðir.

Aðrar íbúðarverkætlanir, sum eru gjørdar á B-øki í serstøku byggisamtykt nr. 7, eru Tórsbyrgi og íbúðirnar við Breiðablik.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at serstaka byggisamtykt nr. 7 verður broytt soleiðis, at ognirnar matr. nr. 1318a og 1319b verður broytt frá A2- øki til B4-øki.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**75/13** **2012-2455 GS**

**Umsókn frá Aslaug Suðuroy um at byggja lítil hús á matr. nr. 67, Kollafirði**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyrispurningur er komin frá Aslaug Suðuroy, dagfest 16.08.2010, um loyvi at byggja eini Dímunarhús ella líknandi hús á matr. nr. 67, Kollafirði. Í dag stendur ein forfallin grund á stykkinum ið omma umsøkjarinum átti.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í 4. grundumráði í byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sum verður í høvuðsheitum nýtt til landbúna og alment frílendi og tilíkt.

Økið uttanum liggur alt í umráðispartinum D3, sum er kannað stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tilíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundstykkið er uml. 252 m² og liggur í 4. grundumráði í Kollafirði. Á grundstykkinum hevur einaferð verið eitt lítið hús, men nú stendur bert ein grund har. Nú ynskir familjan at byggja eini lítil hús á grundstykkið, sum verður uml. 5,0 * 8,1 m, ella 45 m² í eini hædd við lofti. Grundstykkið liggur fram við bygdavegnum.

Økið liggur í 4. grundumráði, men á somu síðu av bygdavegnum eru fleiri onnur grundstykkir sum liggja í 4. grundumráði og sum eru bygd.

Skal tað stóra D3 økið nýtast sum ætlað til stórar almennar stovnar, so eigur byggisamtyktin at verða broytt, soleiðis at matr. nr. 67 eisini verður partur av D3 økinum.

Vísandi til, at onki hús er á stykkinum, men bert ein betonggrund, so skal byggimálið, sambært almennu byggisamtyktini kap. 1 §2 stk. 5, viðgerast sum um talan er um eina heilt nýggja bygging.

Um loyvi fæst at byggja húsið, eru ymisk viðurskiftir við húsinum ið skulu broytast, so tað lýkar treytirnar í byggisamtyktini. Harafturat nýggjar tekningar latast inn.

Byggistigið verður 0,17
Nettonýtslustigið verður 0,27

Umsóknin er ikki í samsvari við byggisamtyktina.

Eitt mál er frá 2001-0945 har fólk frá Todnesi í Kollafjørði, biðja um at fáa húsini tikin niður. Eftir hetta hevur málið verið til viðgerðar í nevndunum, har mælt var til at kommunan keypir ognina. Nevndirnar hava samtykt at taka upp samráðingar

um at keypa ognina. Skriv er sent Trygva Jacobsen um fund viðv. ognini. Síðani sæst ikki at nakað er hent í málinum.

**Frávik:**
Umsóknin inniber fylgjandi frávik:
1) at byggja hús í 4. grundumráði, ið ikki er sama hús sum stóð har áður.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarligt:**
Ongar fíggjarligar bindingar fyri kommununa.
Um kommunan ynskir at broyta byggisamtyktina, soleiðis at grundstykkið verður partur av D3-økinum, kann hetta møguliga hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Er sent til teknisku deild. Tey hava onga viðmerking.
Býarskipanardeildin: Hóast bygt er mest um allan vegin fram við gamla bygdarvegnum í Kollafirði, frá í Homrum til á Kjalnesi, liggur hetta økið í 4. grundumráði sambært byggisamtyktini fyri Kollafjørð. Hetta er ein leivd av gomlu byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sum ikki var tikin við tá ið byggisamtyktin varð broytt soleiðis, at hon samsvaraði almennu byggisamtyktini. Býarskipanardeildin mælir til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt soleiðis, at A1 sethúsaøki verður allan vegin fram við gamla bygdarvegnum á ovaru síðu.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2012-2455/1
Fráviksskjal, j.nr. 2012-2455/4
Viðmerkingar frá, j.nr. 2012-2455/3.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla til, at byggisamtyktin fyri Kollafjørð verður broytt, samsvarandi omanfyri standandi tilmæli frá býarskipanardeildini, og at hesi viðurskifti skulu avgreiðast og góðkennast, áðrenn byggimálið verður avgreitt.

**Kollafjarðanevndin 19. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**76/13** **<u>2013-0064 HH</u>**

**<u>Umsókn um at avlýsa ein servitutt á matr. 965i</u>**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Niels Winther Poulsen søkir, vegna Eik, um at strika servituttin, sum er lýstur á matr. 965i, um at tað ikki er loyvi at byggja á matr. 965i.

***Lógir, ásetingar o.a.:***
*Matr. 965i liggur í A1 økið sum er sethúsaøki og liggur eisini ein partur í B2 økið.sum er vinnuøkið*

**Upplýsing frá umsitingini**:
1989 søkti Søren Müller umboðandi Finn Müller um at sundurbýta eitt grundøki av matr. 965a. Umsóknin bleiv ikki gingin á møti, grundað á at partur av økinum lá í B2 í 3. grundumráði.

Kommunan hevði ætlan um at keypa økið og útvega umsøkjaranum annað øki til keyps, og ein deklaratión bleiv tinglýst, sum partarnir vóru samdir um at Finn Müller fekk annað grundøki til keyps frá kommununi, og at tinglisið var á ognina at onki sjálvstøðugt grundstykki kann býtast frá ognini ella annað sethús kann byggast á ognina. Átalurættin hevur Tórshavnar kommuna.
*Í sambandi við ætlanina tá,* var at ein ætlan um eina vegaføring, sum skuldi gerast frá Skiparagøtu til J.C. Svabos gøtu, síðani er tann ætlanin slept.

Nýggjur eigari kom til matr. 965a, og søkti hann av nýggjum um at sundurbýta í 1997, og var samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 17. mars 1997 at loyva sundurbýti, treytað av at ein gøta 1,5 m skuldi gerast frá Skiparagøtu niðan til J.C. Svabos gøtu.

**Umhvørvisárin:**
Ongar.

**Fíggjarligt:**
Onki.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**
Lendisdeildin vísir til mál nr. 14/2/1997, um sundurbýti av 965a í Sigmundargøtu, at býarskipanarnevndin, á fundi tann 14. apríl 1997, er samd um, at gøta 1,5 m breið skal verða tryggjað í matriklinum 965i.

Býarskipanarliga er hetta gøtusambandið millum J.C. Svabos gøtu og Skiparagøtu sera áhugavert hjá fólki til gongu millum havnaøkið við Skálatrøð til stovnsøkini vestan fyri Fróðskaparsetrið, Náttúrugripasavnið, Debesartrøð, Vinnuháskúlin,

Læraraskúlin og Háskúlin, umframt sniðgøtur til sjúkrahúsøkið og gøtuskipan til íbúðarøkini vestanfyri, Heygsmannavegur, undir Heygnum v.m.
Mælt verður til ikki at strika hetta ítak.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Ongar.

**Skjøl:**
Umsókn frá Niels Winther Poulsen vegna Eik Banka j.nr.2013-0064/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir frá, at servitutturin verður avlýstur, og at umsøkjarin fær sama svar sum undanfarin eigari um, at bygging á ognina verður ikki loyvd. Somuleiðis verður mælt til, at samtyktin frá byggi- og býarskipanarnevndini 14. apríl 1997 verður galdandi, um gøtuna sum skal gerast á matr. 965i niðan móti J.C. Svabos gøtu og beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

Marius Müller fór av fundinum, meðan málið varð viðgjørt.

**Býráðið 2. mai 2013:** Annfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Atkvøtt varð um tilmæli frá teknisku nevnd, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og tveimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Helena Dam á Neystabø

**77/13** **2001-0407 – BH**

**Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.

Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala **veganetinum.**
**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomu-vegnum til Havnar (Ytra Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Farið verður á ástaðarfund undir Krákugjógv.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Eftir at hava verið á staðnum samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við, at vegaføringin í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringvegi) verður framd við tunnli úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í nýggja atkomuvegin við Sundsvegin.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at leggja atkomuveg til Havnar, er Landsverk sum kunnugt farin undir fyrra part av anleggsarbeiðinum, sum er strekkið frá økinum norðan fyri útstykkingina millum Gilja og suður í móti økinum við Oyggjarvegin - undir Krákugjógv.

Sambært Landsverki er ætlanin, at hetta strekkið skal verða liðugt í 2008, og at strekkið frá Skarðshjalla og suður ímóti verandi atkomuvegi skal vera liðugt í 2012.

Landsverk ætlar nú at fara undir vegarbeiðið á strekkinum frá brúnni um Hoydalsá og suður í móti økinum undir Krákugjógv.

Í sambandi við viðgerðina av øllum projektinum um atkomuvegin hjá landsverki, eru ítøkilig viðurskifti, sum kommunan eigur at taka støðu til. Hesi viðurskifti eru:

1. Íbinding við Eysturoyartunnilin
2. Planskyld íbinding við ídnaðarøki og Stórutjørn
3. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
4. Liðugtgerð av planskyldari íbinding norðan fyri útstykkingina Millum Gilja so at atkomuligt er til Flatarvegin
5. Brúgvaskap á vegamótinum millum landsvegin og Flatarvegin. Skal avtala fáast í lag við Landsverk um fyribils at binda í atkomuveg – ella skal farast undir at gera brúgv, áðrenn ferðsla verður á strekkinum.
6. Umlegging av Sundsvegnum
7. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingardalsvegin
8. Støðutakan til íbindingina undir Krákugjógv
9. Støðutakan til íbinding við Hotel Føroyar
10. Støðutakan til atkomuveg til Velbastaðvegin
11. Støðutakan til verandi íbinding við Oyggjarvegin
12. Veitingar á landsvegi
13. Frástøða - byggilinja

Víst verður til fund, j.nr. 2003-1884/12, millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Sp/f HMP-Consult, sum er ráðgevi hjá Landsverki í hesum máli.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í skrivi, dagfest 5. september 2006, at hóast tað framvegis er metingin, at verandi vegaætlan við Villingardalsveg er ein fullgóð loysn, er ráðið sinnað at ganga ynskinum hjá býráðnum um tunnil á møti, um býráðið góðtekur at gjalda kostnaðarmunin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina, sum er í uppskoti, og hartil meirkostnaðin av rakstrinum í eitt áramál.

Sambært einari leysliga meting er kostnaðarmunurin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina einar 30 mió. kr. umframt meirkostnað í rakstri.

Treytirnar fyri einari slíkari avtalu eru, at umrøddi teinur verður landsvegur, at kommunan tekur meirkostnaðin fyri tunnilsloysnina uppá seg, og at Landsverk kann góðtaka loysnina vegatekniskt.

Býráðið eigur eisini at hava í huga, at ferðslan eftir hesum vegastrekki sambært framrokningum fer at økjast tey næstu 15-20 árini í so stóran mun, at tað helst verður neyðugt at gera eitt tunnilsrør afturat og kannast má tí, um tað av teknisku ávum er neyðugt at spreingja tunnil nr. 2 samstundis sum tunnil nr. 1, og um so er, má kommunan eisini gjalda meirkostnaðin av hesum.

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnilin undir Krákugjógv.

Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørivslig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við ytra ringvegnum, tá talan er um frástøða frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l.

Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli undir Krákugjógv ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununnar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting.

Í sambandi við fíggjarliga partin skal eisini vísast á, at ein tunnil vil gerast dýrari í rakstri enn við at hava ein vanligan veg út frá teimum fortreytum, sum landsvegamyndugleikin rekur landsveganetið uppá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mæla kommunustjórin og tekniski stjórin frá at gera tunnil undir Krákugjógv.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, taka støðu á býráðsfundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Nýtt:**
Ráðgevandi fyritøkan P/F HMP Consult hevur fyri Landsverk gjørt nýtt uppskot til nýggja landsvegaføring til og uttan um Tórshavn. Onnur uppskot hava verið gjørd áður.

Í løtuni eru 3 landsvegainnføringar til Tórshavn. Hesar eru eftir Kaldbaksvegnum, eftir gamla Oyggjarvegnum og eftir vegnum í Havnardali frá Gomlurætt. Nýggi landsvegurin norðan fyri høvuðsstaðin kemur at binda saman allar hesar 3 landsvegainnføringarnar til Tórshavn. Nýggi landsvegurin byrjar úr verandi Kaldbaksvegnum beint eystan fyri Skarðshjalla, og fer so gjøgnum Hoyvíkshagan yvir til Villingadal og fram við Húsareyni, har hann verður bundin í verandi Oyggjarvegin. Haðani er vegurin ætlaður at fara gjøgnum Flatnahagan út í Havnardal, har hann verður bundin í verandi landsvegin til Gomlurætt.

Um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gerst veruleiki, kemur hesin at blíva íbundin Kaldbaksvegin ella omanfyri nevnda nýggja landsvegastrekkið.

Landsveganetið í Føroyum bindir saman bygdir og býir, uttan mun til stødd. Í Tórshavn eru fleiri einstakir býlingar, sum einsamallir eru nógv størri enn fleiri bygdir. Framskrivingar av býarmenningini vísa m.a., at serliga uppi í Hoyvíkshaganum, í Vesturbýnum og á Argjum fer munandi vøkstur at verða í bæði fólkatali og tali av bústaðareindum.
Tekniska umsitingin metir tað vera sera umráðandi, at av- og ákoyringar til nýggja landsvegin verða skipaðar í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tryggjast má ein góð fordeiling av ferðsluni, og at bæði verandi og komandi kommunala veganetið er ført fyri at lofta ferðsluni og fordeila ferðsluna á rættan hátt, fyri ikki at fáa ferðsluruðuleika inni í býnum. Tí er eisini umráðandi at tal, stødd og staðseting av íbindingum í landsvegin taka støði í stødd av býlingunum (fólkatal og bústaðareindir), tí sum longu nevnt eru fleiri býlingar sum eru nógv størri enn heilar bygdir.

Í sambandi við viðgerðina av øllum prosjektinum um atkomuveg hjá Landsverk, hevur umsitingin á eini verkstovu 5. desember 2006 viðgjørt niðanfyri standandi viðurskifti.

1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum
2. Íbinding við Eysturoyartunnilin
3. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli

4. Planskyld íbinding við Stórutjørn
5. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
6. Íbinding við Flatarvegin
7. Umlegging av Sundsvegnum
8. Íbinding við Villingadalsvegin
9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin
10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv
11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin
12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar
13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin
14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin
15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk, fjarhita og reinskan av vegvatni.
16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir.
17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum

**Tilmæli:**
Við støði í viðgerðini á verkstovuni mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til, at á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður ferðin avmarkað til 50 km/t, og at íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum stórar rundkoyringar. Hetta er ikki minst neyðugt fyri at fleiri stórir komandi býlingar, sum koma at liggja uttan fyri landsvegin, fáa samband við hendan. Tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 20.000 bilar um samdøgri, kann ferðin hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við Eysturoyartunnilin**
   Onki ítøkiligt fyriliggur enn uppá hvar linjuføringin fyri ætlaða tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina verður, og tískil heldur ikki uppá hvar tunnilin eftir ætlan kemur upp og hvar íbinding verður í landsvegin. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna, sum planleggingarmyndugleiki í kommununi, setir fram krav um at verða við til at taka avgerð um, hvar og hvussu tunnilin kemur upp.

3. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
   Í løtuni fyriliggur ikki eitt nóg neyvt grundarlag at taka støðu til, bæði um, hvar ella hvussu kommunala veganetið við verandi vinnuøkir á Sandvíkarhjalla og Skarðshjalla, og eitt komandi vinnuøki á Ovara Hjalla, skulu bindast í landsveganetið. Mælt verður tí til, at hetta verður kannað nærri

í sambandi við útstykkingar- og byggiætlaninar í økjunum, og at lendi til eina møguliga íbinding við rundkoyring við Ovara Hjalla verður hildi tøkt, til greiða er fingin á hesum. Tí verður mælt til, at vegasamband til Ovara Hjalla verður gjørt við eini rundkoyring frá Hvítanesvegnum.

4. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
   Mælt verður til, at gjørd verður planskyld íbinding við Stórutjørn. Hetta verður fyrsta stóra íbindingin millum kommunala- og landsveganetið á strekkinum, og eigur henda íbinding tí at rindast av Landsverk.
   Mælt verður til, at vegastrekkið frá íbindingini í Kaldbaksvegin til planskyldu íbindingina við Stórutjørn, beinanvegin verður gjørt sum 4-sporaður vegur við mest loyvdu ferð á 80 km/t. Vísandi til omanfyri standandi pkt. 1 verður eisini mælt til, at á vegastrekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður mest loyvda ferðin sett til 50 km/t.

5. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
   Ynski er sett fram um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur norður – tvs. burtur frá Stórutjørn. P/F HMP Consult hevur kannað møguleikan fyri hesum, og onki er til hindurs fyri tí. Men ein slík flyting av vegalinjuni vil viðføra, at ein partur av vegastrekkinum, sum longu er gjørt, má umleggjast. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er av Landsverk mettur til kr. 2,0 mió. Mett verður, at Landsverk undir øllum umstøðum eigur at flyta vegin uml. 25 m longur norður júst við Stórutjørn, fyri at tilpassa vegin betur til lendisviðurskiftini á staðnum – tvs. av umhvørvisávum. Við verandi linjuføring kemur vegurin nærum í sjálva tjørnina, og kemur harumframt beint inn í ein høgan kneysa í lendinum. Mælt verður tí til, at Landsverk skal flyta vegaføringina minst 25 m longur burtur frá Stórutjørn, fyri at fáa vegin at fella betur í lendi og fyri ikki at koma so nær tjørnini.

6. **Íbinding við Flatarvegin**
   Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Flatarvegurin er ein av hesum vegum.
   Fram til 2012, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlan verður liðugur, verður mælt til at Flatarvegur, Sundsvegur og Villingadalsvegur verða bundnir í landsvegin, og at teir partar av vegnum, sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
   Fyri tíðarskeiðið aftan á 2012 verður mælt til, at minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingadalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við rundkoyring, sum er minst 32 m í diametur. Nóg stórt økið skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 og

avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

7. **Umlegging av Sundsvegnum**
   Brúgv er gjørd tvørtur um Hoydalsá. Her er sostatt eisini møguligt at føra Sundsvegin undir landsvegin. Við at binda Sundsvegin í landsvegin, fæst beinleiðis vegasamband inn til bæði Vegin Langa og til Norðara ringvegin. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

8. **Íbinding við Villingadalsvegin**
   Villingadalsvegurin er lutfalsliga smalur, og trupult er at breiðka hann, orsakað av nógvari bygging á báðum síðum av vegnum. Harumframt er ikki pláss til at gera íbinding í Norðara ringvegin við rundkoyring, uttan at taka burtur verandi hús. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

9. **Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin**
   Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingadalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli við Villingadalsvegin ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya Landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Mælt verður tí frá at gera tunnil við Villingadalsvegin.

10. **Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**
    Loysnin í uppskotinum hjá Landsverk er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi. Tekniska umsitingin sær eisini hesa íbinding sum ein part av eini loysn viðv. Landsvegaføringini frá verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Norðara ringveg niðan til Hotel Føroyar. (Sí pkt. 11)
    Mælt verður tí til, at hildi verður fast um upprunaligu loysninga sum er, at gera eina íbinding við rundkoyring og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

11. **Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**
    Landsvegurin er ætlaður at blíva bundin í verandi Oyggjarveg nakað vestan fyri P/F Wenzel Petersen. Oman fyri Hotel Føroyar fer landsvegurin síðani oman av verandi Oyggjarvegi. Henda vegaføring lýkur ikki tær ferðslutekniskar fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild.

Mælt verður tí til, at á strekkinum frá har Landsverk hevur ætlanir um at gera eina planskylda íbinding undir Krákugjógv, til á leið har sum ætlanir eru um planskylda íbinding vestan fyri Hotel Føroyar, skal Landsverk gera 4-sporaðan tunnil í seinasta lagi tá ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar.

**12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar**

Tórshavnar kommuna tekur undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin. Tá talan er um íbinding oman móti býnum, verður mælt til at gera hesa við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding. Nóg stórt øki skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

**13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Tann av P/F HMP Consult teknaða loysnin við íbinding av landsvegnum í verandi landsveg úti í Havnardali, er ikki í samsvar við tað sum áður er teknað. Vegatekniskt er seinasta uppskotið nøktandi, men neyðugt er at fáa betur lýst hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging í økinum og fyri verandi vegir í økinum (Velbastaðvegur og vegin út í Havnardal).

**14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.
Mælt verður til, at um Landsverk ætlar at niðurleggja verandi íbindingar, mugu teir útvega aðrar í staðin. Harumframt verður mælt til takað undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin.

**15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.
Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg sum fer gjøgnum bygt økið, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatnið og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.
Mælt verður tí til at krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni har landsvegir fara gjøgnum bygt økið.
Harumframt er ynskiligt, at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.
Víst verður annars á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

16. **Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**
    Mælt verður til, at ein tílíkur vegur gjøgnum bygt økið hevur gonguteigar og súkklubreytir, soleiðis at sleppast kann undan at gangandi og súkklandi – m.a. útlendsk ferðafólk – ganga og súkkla á koyribreytunum millum bygdir, soleiðis sum tey gera flestu staðni sum nú er. Stórt tal av ferðandi koma hvørt ár til Havnar og fara herfrá víðari kring landið.
    Víst verður annars á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

17. **Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**
    Av tí at talan er um ein landsveg, sum fer ígjøgnum partvíst bygt økið, og økið sum í byggisamtyktini fyri Tórshavn er lagt av til byggilendi, metir tekniska umsitingin, at tað er ikki grundarlag fyri at áseta størri fjarstøðu enn 25 m frá vegmiðju til byggiljuna fram við landsvegnum. Tó verður mælt til, at tað í sambandi við byggilinjuna verður tikin hædd fyri teimum støðum, har íbindingar væntast at koma í framtíðini, sum antin rundkoyringar ella planskyldar íbindingar.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2006:** Tikið av skrá.

**Nýtt:**
Landsverk hevur hin 31. januar 2007 havt framløgu fyri byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini av vegaprojektinum um nýggjan landsveg frá Kaldbaksvegnum til Havnardal. Sama dag, gjøgnumgingu omanfyri nevndu faknevndir einkultu partarnar av málinum, og var hetta framhald av tí nevndarviðgerð, sum frammanundan hevur verið í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Tilmæli hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og býararkitektinum fyri einstøku punktini er eftir henda fundin tillagað soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**
   Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at **allur** vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður út frá hesum fyritreytum.
   Mælt verður tó samstundis til:
   a) **at** á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar verður ferðin avmarkað til 50-60 km/t

b) **at** íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum vanligar T-kross íbindingar, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** biðja Landsverk um ferðslutekniskar kanningar av hvat er hóskandi sum mest loyvda ferð á strekkinum, har vanligar T-íbindingar og/ella rundkoyringar verða, av tí at talan verður um bygt øki á báðum síðum av vegnum.
d) **at** tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 18.000 bilar um samdøgri, ella onnur ferðsluviðurskifti viðføra ónøktandi framkomiligheit, kann ferðin um neyðugt hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

**2. Íbinding við tunnil hjá P/F Skálafjarðartunnilin**

Vísandi til §5, stk. 3, litra 6 í *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, og *Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu* verður mælt til:

a) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa tekningar og nærri upplýsingar, um hvussu veganetið á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilin, til góðkenningar.
b) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi.

**3. Íbinding/frákoyring við núverandi Hvítanesvegin**

Mælt verður til:

a) **at** biðja Landsverk um neyvar tekningar og frágreiðing, um hvussu íbindingin/frákoyring millum nýggja landsvegin og Hvítanesvegin verður gjørd, til góðkenningar.

**4. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkahjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**

Mælt verður til:

a) **at** kommunan útvegar sær lendi til vinnuøkið á Ovara Hjalla umframt lendi til vegaatkomu frá Hvítanesvegnum niðan á Ovara Hjalla og lendi til gerð av rundkoyring við Hvítanesvegin.
b) **at** kommunan letur gera útstykkingarætlan og tekniskt projekt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla
c) **at** kommunan letur gera kanningar av íbinding í nýggja innkomuvegin, og leggur av lendi til antin íbinding við rundkoyring ella T-kross íbinding á økinum við Ovara Hjalla. Víst verður í hesum sambandi eisini til omanfyri standandi pkt. 1a.

**5. Planskyld íbinding við Stórutjørn**

Mælt verður til:

a) **at** takað undir við uppskotinum hjá Landsverk um at gera planskylda íbinding við Stórutjørn, vísandi til væntandi nógva ferðslu og virksemi á hesum øki.
b) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar, og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**6. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**

Sambært upprunaligu linjuføringini, sum Tórshavnar kommuna ikki hevur fingið til ummælis, kom landsvegurin at ganga gjøgnum tjørnirnar á økinum. Samstundis hava interessentar í økinum sett fram ynski um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur vestur – tvs. burtur frá Stórutjørn. Onki er til hindurs fyri hesum.

Tí verður mælt til:

a) **at** landsvegurin verður fluttur 50 m longur vestur á økinum við Stórutjørn.
b) **at** nýggi sambindingarvegurin verður longdur tilsvarandi 50 m.
c) **at** kostnaðurin fyri arbeiðið verður at rinda av interessentunum, sum ynskja flyting av vegnum.

**7. Íbinding við Flatarvegin, Sundvegin og Villingardalsvegin**

Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Hetta fyri at høvuðsstaðurin eisini kann fáa veruliga nyttu av nýggja landsvegnum. Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **at** fram til 2010, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlanunum hjá Landsverk verður liðugur, verða Flatavegur, Sundsvegur og Villingardalsvegur bundnir í landsvegin beinanvegin og at teir partar av vegnum sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
b) **at** fyri tíðarskeiðið aftan á 2010 skulu minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingardalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við vanligum T-kross íbindingum, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** nóg stórt øki skal verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera ferðslutekniskt hóskandi íbindingar har um leiðir, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar ella um onnur ferðsluviðurskifti gera tað neyðugt, so sum ónøktandi framkomiligheit o.l.
d) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**8. Tunnilsloysnir við Villingardalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingardalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um

frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Hetta er m.a. grundað á simuleringar av óljóði frá landsvegnum, sum Landsverk hevur latið gera, og hevur lagt fram fyri limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli einans við ovasta part av Villingardalsvegnum ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **ikki** at gera tunnil bert við ovara part av Villingardalsvegnum.
b) **at** Landsverk verður biðið um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein longri tunnil líka frá ovara parti av Villingardalsvegnum vestureftir undir Húsareyn, sum kemur útaftur vestan fyri Hotel Føroyar.
c) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um útreiðslubýtið.

**9. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Tann 2-sporaða fyribilsloysnin hjá Landsverk við íbinding beinleiðis í vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen verður als ikki mett nøktandi, tí hon verður ikki mett at beina ferðsluna inn á Norðara ringveg/Marknagilsvegin á ein tryggan og forsvarligan hátt.

Tann 4-sporaða framtíðarloysnin í uppskotinum hjá Landsverk, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar, er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi.

Á hesum grundarlagi verður mælt til:

a) **at** tá talan er um fyribilsloysnina við 2-sporaða vegnum, verður hildið fast um upprunaligu loysnina, sum er at gera eina íbinding við rundkoyring, og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.
b) **at** tá talan er um 4-sporaðu framtíðarloysnina, verður í fyrsta lagi víst til tilmæli til pkt. 8.b um at gera ein tunnil líka frá endanum á Villingardalsvegnum til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar..
c) **í øðrum lagi** verður mælt til at Landsverk, í samstarvi við kommununa, verður biðin um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein styttri tunnil uml. frá st. 6800 til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar. Hetta tilmæli er grundað á ferðslutekniskar orsøkir, og eigur tí at verða rindað til fulnar av landinum. Landið vil við hesum samstundis spara útreiðslur til ognartøkur, óljóðsverju o.a. á hesi leiðini, eins og tað slepst undan trupulleikanum við verandi íbindingum í Landsvegin við Brandstøðina, P/F Norðbil, P/F Wenzel Petersen og sethús á umrødda vegastrekki.

d) **at** gjørdar verða kanningar av hvørt Villingardalsvegurin ella ein nýggjur sambindingarvegur millum innkomuvegin og innara ringveg skal gerast fyri at binda saman hesar vegir, um tunnil verður gjørdur jbr. pk.t 9c ella 9d.

**10. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Tekniska umsitingin metir, at vegaføringin frá P/F Wenzel Petersen til íbindingarnar vestan fyri Hotel Føroyar, lýkur ikki tær ferðsluteknisku fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild á øðrum strekkjum. Tí verður mælt til:

a) **í fyrsta lagi** at Landsverk ger ein longri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b.
b) **í øðrum lagi** at Landsverk ger ein styttri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 9.c.
c) **at** kommunan, sum avleiðing av aðrari av tunnilsloysnunum, yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen.

**11. Vegasamankomingar á økinum vestan fyri Hotel Føroyar**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, nøkulunda soleiðis sum projekterað av ráðgevunum hjá Landsverk.
b) **at** taka upp samráðingar við Landsstýrið/Fiskimálaráðið um keyp av lendi burtur av ”antennuøkinum”, matr. nr. 1231.
c) **ikki** at gera rundkoyring, men vanliga T-kross íbinding, har núverandi Oyggjarvegurin verður bundin í nýggja landsvegin, grundað við at onki er sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring við henda vegkross.
d) **at** nýggj íbinding oman móti býnum verður gjørd við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding.
e) **at** nóg stórt øki tó verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, seinast tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000.

**12. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Mælt verður til:

a) **fyribils at** taka undir við uppskotinum hjá Landsverk til vegaføring í Havnardali og íbinding í Velbastaðvegin, sum tekniska umsitingin metir vegatekniskt at verða nøktandi.
b) **at** biðja Landsverk um neyvari upplýsingar um hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging og vegir í økinum (Velbastaðvegin og vegin út í Havnadal), og somuleiðis fyri framtíðar møguleikarnar fyri bygging og vegum í økinum, áðrenn endalig góðkenning verður givin.

**13. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til:

a) **at** tunnil verður gjørdur jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b. ella pkt. 9.c., og at kommunan sum avleiðing av hesum yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen, sum so verður kommunalur vegur, jbr. pkt. 10.c.

b) **at** uttan mun til um vegurin verður verandi landsvegur ella verður kommunalur vegur, má avvarðandi eigari av vegnum útvega nýggjar íbindingar fyri allar tær verandi íbindingarnar, sum verða burturbeindar ella fluttar.

**14. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum, sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.

Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg, sum fer gjøgnum bygt øki, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatninum og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.

Mælt verður til:

a) **at** krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni, har landsvegir fara gjøgnum bygt øki, og at samráðingar verða við Landsverk um útreiðslubýtið í hesum sambandi.

b) **at** krav verður sett Landsverk um burturbeining og reinskan av vegvatni, jbr. býráðssamtykt, j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

**15. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**

Vísandi til krøv um ferðslutrygd fyri ein slíkan veg, sum fer gjøgnum bygt øki fyri bæði gangandi og súkklandi fólk, verður mælt til:

a) **at** Landsverk letur gera gonguteigar og súkklubreytir, jbr. býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

b) **at** hámarksferðin fyri vegastekkið frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður samsvarandi omanfyri standandi pkt. 1.c

**16. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**

Mælt verður til:

a) **at** gera avtalu við Landsverk um eina byggilinju fram við Landsvegnum, sum liggur í eini fjarstøðu á 25 m frá vegmiðju, á øllum vegastrekkinum, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tó verður mælt til at tað í sambandi við byggilinjuna í samráð við Landsverk verður tikin hædd fyri størri

fjarstøðu á teimum støðum, har størri íbindingar væntast at koma í framtíðini.

**17. Verja móti óljóði**

Vísandi til pkt. 16 er umráðandi at tað, har nýggi landsvegurin fer gjøgnum býin, ikki koma at liggja stór øki á báðum síðum, sum verða ónýtilig til bygging. Tað eigur at kunna byggjast í øllum førum so nær sum 25 m frá vegmiðju, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tí verður mælt til:

a) **at** krav verður sett Landsverk um at verja móti óljóði eigur at verða gjørd fram við vegnum allan vegin frá Kaldbaksvegnum til Havnardal, har lendisviðurskiftini ikki loysa trupulleikan við óljóði við støði í hámarksferðini á vegastrekkinum, jbr. frammanfyri standandi pkt. 1a, og við støði í at óljóð skal verða max 55 dB í eini frástøðu á 15-20 m frá vegmiðju.

b) **at** byggimyndugleikin – t.e. Tórshavnar kommuna – skal góðkenna slíkar ljóðverjur við atliti til útsjónd, tilfar o.a., og at ljóðverjan í minst møguligan mun skal taka burtur útsýnið og møguleikarnar fyri orientering hjá bilførarunum.

**18. Byggimálsviðgerð og avtala við Landsverk.**

Mælt verður til:

a) **at** fráboða Landsverk, at vegurin skal viðgerast og hava loyvi frá Tórshavnar kommunu, sum byggimyndugleiki, sambært *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir,* §5, stk. 3, litra 6 og sambært *K. Nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð*.

b) **at** vísa Landsverk á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436 og á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um fyribils íbindingar, endaligar íbindingar, projektbroytingar, býtislykil fyri ávísar útreiðslur o.a.

**19. Tíðarætlan og raðfylgja.**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við ætlanini hjá Landsverk at gera vegin lidnan til 2010.

b) **at** gera avtalu við Landsverk um í fyrstu atløgu at arbeiða norðureftir frá har vegurin nú er, og so samstundis at gera tær kanningar v.m. viðv. vegaføringini frá har vegaarbeiðið er komið til nú við endan á Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin, vísandi til omanfyri standandi tilmæli í punktunum 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13, og at framhaldið av arbeiðinum suðureftir verður tikið uppaftur, tá nevndu viðurskifti eru loyst.

c) **at** Landsverk og Tórshavnar kommuna í felag arbeiða við at lýsa og loysa omanfyri nevndu viðurskifti, at leggja fyri til endaliga góðkenning seinast 1. desember 2007.

**20. Ferðslutrygdarmeting**

Mælt verður til:

d) **at** projektið viðv. nýggja innkomuvegnum, íbindingar í kommunala veganetið, og fordeilingin av ferðslu frá innkomuvegnum inn á kommunala veganetið, verður latið serkønum at meta um, serliga við atliti til ferðslutrygd.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum viðmerkingum:

- Viðv. pkt. 7.b vil ein minniluti, Høgni Mikkelsen, hava at allir tríggir verandi vegir á staðnum skulu bindast í landsvegin.
- Nevndin varð samd um at strika pkt. 8.c.
- Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin viðgjørdi og samtykti at taka undir við tilmælunum til hesi puntk: pkt. 4 a og b, pkt. 6, pkt. 11 a og b, pkt. 12 b, pkt. 14 a, pkt 16, pkt 17 a, og b og pkt. 18 a.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Viðv. pkt. 7b mælir ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, til at allir tríggir vegirnir skulu bindast í landsvegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen og Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin

Kathrina Frýdal, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

At enda varð samtyktin í fíggjarnevndini einmælt samtykt.

- Umsitingin leggur fram frágreiðing frá Rambøll.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2008:** Grundað á niðurstøðuna í ferðsluanalysu hjá Rambøll & Nyvig A/S frá apríl 2008 (j. nr. 2001-0407/79), samtykti nevndin at heita á umsitingina at taka upp samráðingar við Vinnumálaráðið og Landsverk á hesum grundarlagi:

1. at mest loyvda ferð á innkomuvegnum, á strekkinum frá Stórutjørn (T2) til íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar (T8), verður 60 km/t,
2. at flest møguligar íbindingar á nevnda strekki verða gjørdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. apríl 2008:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við leiðslsuni og umboð frá teknisku nevnd havt samskifti við landsstýriskvinnuna í innlendismálum – Anniku Olsen. Eitt av málunum, ið partarnir eru samdir um at royna, er at fáa sett gongd á avtalu, ið fyribils loyvir kommununi at nýta partar av innkomuvegnum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Kunnað varð um málið, og nevndin ynskir at viðgera málið á næsta fundi tann 4. marts 2010.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Kunnað var um málið.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Á løgtingsfíggjarlógini eru settar av kr. 10 mió. til nýggja innkomuvegin til Tórshavn. Landsverk hevur í hesum sambandi verið á fundi við umsitingina, til

tess at finna fram til eina semju um, hvussu arbeiðið kann halda fram, soleiðis at játtanin fyri 2013 verður nýtt. Landsverk er framvegis av tí áskoðan, at nýggi innkomuvegurin skal gerast út frá teimum fortreytum, at hámarksferðin skal verða 80 km/t. Hetta viðførir ymisk dýrkandi krøv til hvussu íbindingarnar skulu gerast uppá sikt, tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, sambært framskrivingum sum gjørdar eru.

Í hesum sambandi hevur serliga verið roynt at finna eina hóskiliga loysn á, hvussu Sundsvegurin kann knýtast í nýggja innkomuvegin, og hevur Landsverk tilevnað eitt uppskot, sum umsiting kommununar metir at verða ein nýtilig loysn, undir teimum umstøðum sum eru á staðnum.

Eisini hevur íbindingin í Oyggjarvegin verið til viðgerðar, og er lagt upp til eina loysn sum er nøktandi í nøkur ár fram. Tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, er neyðugt at taka hesa íbinding upp aftur til nýggja viðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fylgjandi:

- at loyva Landsverk at halda áfram við vegagerðini frá brúnni um Hoydalsá og vestureftir
- at taka undir við prinsippuppskotinum til íbindingarloysn við Sundsvegin
- at játtanin hjá Landsverk í ár verður brúkt til at gera íbindingina við Sundsvegin, og at restin av játtanini verður brúkt til at halda áfram við vegagerðini vestureftir, oman móti Krákugjógv
- at gera avtalu við Landsverk um, at framhald av arbeiðinum í 2014 og komandi ár, verður gjørt eystureftir, soleiðis at bundið verður í Kaldbaksvegin, áðrenn hildið verður áfram vestureftir. Hetta fyri at fáa vegasamband frá Kaldbaksvegnum til Sundsvegin liðugt fyrst.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Tikið av skrá.

- Nú fór Bjørghild Djurhuus

**78/13** **2013-0855 TíH**

**Lendisgøtur**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Vísandi til fund hjá borgarstjóranum við umboð fyri ríðifeløgini, Annu og Óla Rubeksen, tann 15. mars 2013, um lendisgøtur, ríði- og varðagøtur í haganum kring Tórshavnar bý og bygdirnar fyri vestan í kommununi.

Kortskjal varð lagt fram vísandi gøtur í Hoyvíkshaga, Húsahaga, Flatnahaga, og í hagunum vestanfyri til Velbastaðar og Kirkjubøar. Kortið vísti støðuna á ymsu teinunum. 9,1 km av góðum gøtum, 17,5 km av gøtum, ið krevja ábøtur og 2,1 km í uppskoti til nýggjar gøtur.

Anna og Óli tosaðu um eitt nýtt slag av ríðikappingum, -cross country-kappingum, ið eru væl umtóktar í grannalondunum, og um hvussu hetta kundi verið eitt munagott íkast til ferðavinnutilboðini í býnum og øllum Føroyum.

Ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging, og mangt annað um hetta, varð havt á máli.
Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

Góðar lendisgøtur, sum tær kring Vesturvarða og Norðasta Horn, kosta meiri enn 700 kr/m².

Avgjørt varð, at málið skuldi lýsast til fyrstkomandi fund í teknisku nevnd við tilmæli um, at Tórshavnar býráð tekur málið upp, at gera skipanar- og tilgongdarætlan, við atliti at ognarviðurskiftum, brúksrættindum og viðlíkahaldsskyldum fyri nevndu gøtur, og aðrar líknandi gøtur í allari kommununi. At mælt verður til at seta av 1 mill. at byrja arbeiðið við.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býargartnarin mæla til at taka undir við omanfyri standandi, at gera skipanarætlan v.m. og at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið til raðfestingar á íløguætlanini, til tess at byrja verkætlanina.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at gera skipanarætlan fyri gøtur í allari kommununi og at beina málið, umvegis fíggjarnevndina, í býráðið.

Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 800.000 kr. av konto 6275, framfluttar løgujáttanir og beina málið í býráðið. Málið kemur fyri aftur á komandi fundi við atliti til meirjáttan.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt

**79/13** **<u>1999-0345</u>**

**<u>Høllin á Hálsi - nýtt gólv</u>**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørv-ar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhald-andi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin

hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og um-væling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í "føroyskum kr" 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írest-andi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað

soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtanina til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |

| | | |
|---|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

<u>at</u> peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út- og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsingar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |
| Mvg 6,25% | kr. | 390.927 |
| | | |
| Samlað við MVG | kr. | 6.696.202 |

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur,

eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Nýtt:**
Lisitatiónin var 22. des. 2010 og tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| ÁTS S/pf. | 6.117.725,56 kr. |
| Karstin A. Joensen S/pf. | 6.183.979,25 kr. |
| Valbjørn Dalsgarð S/pf. | 6.302.015,96 kr. |
| Bjarni Poulsen S/pf. | 6.343.814,48 kr. |
| Búsetur S/pf. | 6.545.180,00 kr. |
| Húsavarðatænastan S/pf. | 6.678.556,15 kr. |

Metingin hjá HMP-Consult 6.725.000,00 kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini, og mæla til at taka upp samráðingar við ÁTS, sum áttu lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við ÁTS.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í skrivi til mentamáladeildina dagf. 13. september 2011 vísa leiðarin á Hallarumsitingini og leiðarin á Húsaumsitingini á bráðneyðugan tørv at skifta gólvið og takið. Víst verður á, at gólvið er í sera ringum standi og krevur nógv dagligt viðlíkahald, og tí treingir tað til at skiftast. Víst verður eisini á, at tá hugsað verður um, at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða, tá takið verður skift.
Høllin á Hálsi tørvar eina størri umvæling bæði innan og uttan. Ein heildarumvæling av høllini verður sambært HMP Consult mett at kosta millum kr. 18-20 mió. Á fíggjarætlanini konta 5775 Ítróttaranlegg eru í 2012 settar kr. 2,5 mió av til framhaldandi umvælingar, sambært fíggjarætlanartekstinum skulu m.a. gólvið og takið skiftast. Greitt er, at til ber ikki at skifta bæði gólvið og takið í einum fyri hesa upphædd, men fíggingin røkkur til at skifta gólvið.

Høllin hevur øll árini verið karmur um fleiri ítróttagreinar, samkomutiltøk, handilsmessur, dans og konsertir o.a. mangt. Krøv til gólv eru ymisk, alt eftir, hvat virksemið skal vera – eitt nú skal gólv til ítrótt vera bleytt, tó at krøvini hjá ymsu ítróttagreinunum eisini kunnu vera ymiskt. Gólv til eitt nú at bera bilar skal hinvegin vera hart.

Gamla gólvið hevur víst seg at vera sera gott og haldført. Ætlanin er, at høllin eisini framyvir skal vera karmur um fjøltáttað virksemi. Metast má tí skilagott, at nýggja gólvið verður bygt upp á sama hátt við møguligum smáum betringum. Ætlanin er ikki at broyta høllina annars.

Fyri ikki at órógva kappingarárið 2012-2013 ov nógv, er neyðugt, at arbeiðið at skifta gólvið verður byrjað og gjørt liðugt beinanvegin. Tá takið verður skift, verður neyðugt at verja gólvið væl, so at tað ongan skaða fær. Mælt verður tí til, at tøka íløgujáttanin kr. 2,5 mió verður brúkt til at skifta gólvið.

Fyri at arbeiðið skal ganga so skjótt sum møguligt, verður mælt til, at Húsaumsitingin, í samstarvi við Hallarumsitingina, standa fyri upptøku og burturbeining av gamla gólvinum, meðan arbeiðið at keypa og leggja nýggja gólvið á verður bjóðað út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Mett verður tó eisini neyðugt, at gongd verður sett á heildarumvælingarnar, t.e. millum annað at skifta takið, ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan. Til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi. Mælt verður harumframt til, at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at játta kr. 2,5 mió av íløgukontu 5775 Ítróttaranlegg til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti Jógvan Arge, Maria Hammer Olsen og Elin Lindenskov mæla til at peningur verður játtaður at skifta takið v.m. í 2013.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen mæla til at fylgja tilmælinum at settar verða í alt umleið kr. 20 mió av á íløguætlanirnar fyri 2013 og 2014 til at umvæla bygningin lidnan.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 2,5 mió. Av konto 5775, ítróttaranlegg, til at skifta gólvið í Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeiðið uppá útskifting av gólvplátum og álegging av nýggjum sportslinoleum er boðið út sum undirhondsboð av HMP- Consult, ið eru ráðgevar í málinum. Tilboðini vóru hesi, uttan mvg:

Skifta gólvplátur v.m.

- Træsmiðjan Sp/f 598.210,- kr.
- Articon P/f 537.480,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 520.000 kr.

Nýtt sportlinoleum v.m.

- Gólvbúni Sp/f. 414.750,- kr.
- Eyðfinn K. Eyðunsson Fa. 388.500,- kr.

- Metingin hjá HMP-Consult 424.000,- kr.

HMP-Consult hava kannað tilboðini og mæla til at skriva arbeiðstøkusáttmála við ávikavist Articon og Eyðfinn K. Eyðunsson, sum áttu lægstu tilboðini.

Eftir samráðingar við Articon um nakrar broytingar, er semja um sáttmálaupphæddina kr. 437,000,-.

Viðv. samlaða fíggjartørvinum verður víst til j. nr. 2012-1785.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðunum við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, frá ávikavist Articon á kr. 437.000 og Eyðfinn K. Eyðunsson á kr. 388.500, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmálar við hesar.

**Mentamálanevndin 26. juli 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Maria H. Olsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 26. juli 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðunum frá Articon við teimum broytingum, sum avtalaðar eru, og at umsitingin fær heimild til at taka upp samráðingar við Eyðfinn K. Eyðunsson og Gólvbúna Sp/f og gera sáttmála um eitt gólv/sportslinoleum av sama slag sum verandi gólv.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høllin á Hálsi hevur stóran umvælingartørv. Í fjør varð gólvið skift (konta 5775, L 57003 Høllin á Hálsi). Sum tað framgongur av málslýsingini omanfyri, er bráðneyðugur tørvur á at skifta takið í høllini. Víst verður eisini á, at ein heildarumvæling av høllini er neyðug, tað er at skifta takið, nýggja ventilatiónsskipan, klæða allan bygningin uttan, skifta vindeygu og hurðar, dagføra atkomuna, ábøtur á brunaviðurskifti eins og el- og hvs-arbeiði og aðra fríðkan.

Við støði í kostnaðarmeting frá september 2011 varð mett, at til hetta endamálið eigur játtan í alt umleið kr. 20 mió at verða sett av á íløguætlanini fyri árini 2013 og 2014. Á íløguætlanini fyri 2013 eru settar kr. 10 mió, sum í høvuðsheitum røkkur til at fáa skift takið og orkusparandi ventilatiónsskipan. Harumframt er eitt avlop á kontu L57003 uppá umleið 1 mió, sum kann verða flutt til tey arbeiði, sum gerast skulu í summar.

Sum fyrireikingar av arbeiðinum skal útbjóðingartilfar gerast. Mælt verður til at bjóða byggiarbeiðið út sum innboðin lisitatión. Ætlandi skal arbeiðið fremjast í summar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gera útbjóðingartilfar og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión. Harumframt verður mælt til at játta kr. 10 mió av íløgukontu 5775 fyri 2013 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta 10 mió. kr. av íløgukonto 5775 fyri 2013 til arbeiðið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**80/13** <u>**2010-0498**</u>

<u>**Fígging av fótbóltsvølli í Hoyvík**</u>

## Lýsing av málinum – samandráttur:

Tørvur er á fótbóltsvøllum í býnum, og m.a. fótbóltsfelagið FC Hoyvík hevur spurt Tórshavnar kommunu, hvørjar framtíðarætlanir

kommunan hevur í Hoyvík viðvíkjandi hesum spurningi. Sum støðan er nú, fær felagið, eins og onnur nýggj feløg, einans 'avlopstíðir' til venjingar sínar, og hetta ger, at tað er sera trupult at menna felagið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Byggi- og býarskipanardeildina um at kanna møguleikarnar fyri at staðseta ein fótbóltsvøll í Dalinum Langa, omanfyri Hoyvíkar skúla.

**Mentamálanevndin 3. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Mikael Viderø, býararkitektur, greiðir frá kanningini.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 29. september 2010:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at halda fast við staðsetingina av fótbóltsvølli í Hoyvík við skúlan við Løgmannabreyt.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Framlagt og umrøtt.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá formanninum, er hetta málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini eru 1,2 mió kr. tøkar til at staðseta og fyrireika fótbóltsvøll í Hoyvík. Víst verður á, at ov trongt er í Gundadali, og at Hoyvík eins og Argir eigur at hava egnan fótbóltsvøll til sítt felagslið.

Til tess at fyrireka fótbóltsvøllin, sum skal lúka krøvini hjá FSF, skal gerast tekniskt prosjekt og endaliga kostnaðarmeting. Arbeiðið at gera sjálvan vøllin kann somuleiðis byrja innanfyri givna fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,2 mió kr. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting av fótbóltsvølli í Hoyvík og at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus samtyktu at játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

1) at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
2) at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
3) at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Býráðið 29. mars 2012:** Býráðið samtykti at taka undir við fíggjarnevndini, at játta 1,2 mió. kr. av konto 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at byrja málið við at eftirkanna staðsetingarnar og leggja málið fyri faknevndir og býráðið til endaliga góðkenning, innan projekt verður gjørt.

Formaðurin ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Ískoyti:**
Vísandi til býráðssamtyktina 29. mars 2012, kann arbeiðið við at eftirkanna staðsetingarnar at leggja fyri faknevndir og býráðið skipast soleiðis:

- arbeiðið at eftirkanna staðsetingarnar verður latið ráðgeva uttanífrá at gera.
- kanningin fevnir um staðsetingarnar sunnan fyri Skúlan við Løgmannabreyt og í Dalinum Langa, omanfyri Hoyvíkar skúla, umframt at kanna eftir um tað eru onnur øki í Hoyvík sum eru betri egnaði til endamálið.
- kanningin verður gjørd sum ein greining av avleiðingum av at leggja vøllin á hesum støðum og skal m.a. innihalda: plásstørv, víðkanarmøguleikar, pláss til áskoðarar, felagshús o.a., ávirkan á býarskipan, atkoma, ferðsla og parkering, ávirkan á grannalag (fysiskt og umhvørvisliga), veðurlagið og kostnað.
- settar verða upp til kr. 500.000 til hetta arbeiði.
- kanningararbeiðið verður boðið út sum undirhondsboð.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir málið á skrá til umrøðu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at eftirkanningin av staðsetingini verður gjørd eftir leistinum í ískoytinum omanfyri, at kanningin verður løgd fyri nevndina í september 2012 og at nevndin verður kunnað á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av kanning av staðsetingini út sum undirhondsboð millum HMP-Consult og Landsbyggifelagið. Sí útbjóðingarskjal TK j.nr.2010-0498/14. 2 tilboð er komin inn. Tilboð frá LBF áljóðandi 253.000 kr. og HMP-consult áljóðandi 249.000 kr. Sí hjálagt skjal lisitatiónsprotokol TK j.nr 2010-0498/16. HMP-Consult hevði lægsta tilboðið og er tí biðin um at standa fyri kanningini. Úrslitið av kaningini verður latin Tórshavnar kommunu 17.sept.2012.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
HMP-Consult hevur latið inn kanning av tveimum møguligum staðsetingum í Hoyvík og eitt alternativt uppskot til staðseting. Kanningin viðgerð plásstørv, atkomuviðurskifti, víðkanar møguleikar, býarskipanarligar avleiðingar, sum lýst í útbjóðingartilfari. Sí kanningarúrslit j.nr. 2010-498/19/9 "Svarskriv til TK".

Samanumtikið er eingin beinleiðis niðurstøða, men eitt endaligt kjak av fyrimunum og vansum við ávíkavist staðseting A og B. Afturat er gjørt eitt alternativt uppskot til staðseting. Alternativa uppskotið er staðsett í norðara endanum av Dalinum Langa, og fevnir um ein vøll og eitt ítróttaranlegg við smærri vøllum og fótbóltshøll. Uppskotið vísir á møguleikan fyri einum ítróttaranleggi við víðkanar møguleikum. Uppskotið krevur tó umfatandi lendisviðgerð, og tað er ikki í samsvari við verandi ætlanir um íbúðarbygging á heygginum vestanfyri Føroya Tele, og ei heldur um ætlanir at varðveita Dalin Langa sum fríøki fyri býarpartin.

Umboð fyri HMP kemur á fundin at greiða frá kanningini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** HMP greiddi frá kanningini. Málið verður tikið uppaftur á seinni fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2012:** Nevndin samtykti at umsitingin kemur við einum tilmæli til komandi fund.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við støði í frágreiðingini frá HMP og grundað á ástaðafund mett um ymsu staðsetingarmøguleikarnar. Umsitingin metir ikki, at nakrar greiðar grundgevingar og niðurstøða er sum talar fyri, at staðsetingin við Skúlan

viðLøgmannabreyt er minni egnað enn staðsetingin viðMyllutjørn. Eftir ástaðarfundin metir umsitingin harumframt, at inntrivið í Dalin Langa gerst so mikið stórt við alternativa uppskotinum hjá HMP, at upprunaliga ætlanin at hava Dalin Langa sum fríøki í hesum tættbygda økinum, verður ikki møgulig.

Umsitingin hevur tí arbeitt víðari við málinum, og hevur, við atliti til ferðslumøguleikar, frástøðu frá verandi bústaðabygging í økinum, at minka um inntrivini í lendið og fyri at kunna varðveita møguleikan at gera Dalin Langa til fríøki, mett at ein onnur alternativ staðseting ovast í dalinum eystaru megin dalin, er møgulig. Avleiðingin av hesi staðseting er tó, at tað sum verður eftir av økinum eystaru megin Dalin Langa, sum upprunaliga er ætlað til tætta bústaðabygging, ikki kann nýtast til tað endamálið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin velur millum staðsetingina við Skúlan við Løgmannabreyt ella alternativu staðsetingina ovast í Dalinum Langa, á eystaru síðu, og at játta avsetta fíggjarkarmin til vøllin, at gera endaligt prosjekt til valdu loysnina, og at beina málið í býráðið um mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. desember 2012:** Ein meiruiluti: Levi Mørk og Jákup Símun Simonsen mælir til at staðseta vøllin sambært uppskot A í frágreiðing frá HMP Consult 17. september 2012 og at beina málið í faknevndir og býráðið sambært býráðssamtykt 29. mars 2012.

Ein minniluti: Bogi Andreasen mælir til at hava borgarafund um staðsetingarnar.

Ein minniluti: Elin Lindenskov tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2012:** Út frá einari heildarmeting, ið tekur atlit til bæði fíggjarlig og býarskipanarlig viðurskifti, samtykt at mæla býráðnum til at halda fast við upprunaligu staðsetingina av fótbóltsvøllinum við skúlan við Løgmannabreyt.

**Býráðið 13. desember 2012:** Fyrst varð **a**tkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at sleppa ætlanini at gera ein fótbóltsvøll í Hoyvík, vísandi til at talan er um íbúðarøki og harafturat er ov veðurhart til uttanduraleik. Tí verður býráðnum mælt til, at kanna møguleikarnar fyri at gera eina fótbóltshøll í Hoyvík, ið fall við einari atkvøðu fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen.

Síðan varð atvkøtt um meirilutatilmæli frá Byggi og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at fyrireika og at byggja nýggjan vøll í Hoyvík og mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta kr. 1 mió av íløguætlanini 2013 konta 5775 at leggja aftrat tøku játtanini til endamálið konta 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálnevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2013 konta 5775 at leggja afturat tøku játtanini til endmálið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrina Frýdal, ið vísir til tilmælið á býráðsfundinum 13. desember 2012, um at sleppa ætlanini at gera fótbóltsvøll í Hoyvík grundað á, at staðið er sera ábært, liggur ov høgt, heili 120 m. omanfyri sjóvarmálan og tískil óegnað til uttanduraleik, harumframt er talan um eitt íbúðarøki. Mælt verður til at nýta tøku játtanina til at fyrireika og byggja eina fótbóltshøll í Hoyvík, ið fall við einari atkvøðu fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jógvan Dam.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

**81/13** **2011-0953**

**Dekksbáturin Fram**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Loyvi um at virka fyri at keypa dekksbátin Fram, frá Søren Pram Sørensen.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at taka upp samráðingar við Søren Pram Sørensen við tí fyri eyga at keypa dekksbátin Fram.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Kunna varð um málið.

**Ískoyti:**
Báturin er bygdur í 1923. Sambært eigara, er báturin væl røktur og í góðum standi.

Fundur hevur verið við umboð fyri eigaran, ið vil selja kommununi bátin fyri kr. 700.000.

Eigarin hevur játtað at fáa tekniska meting til vega frá Mourits Mohr og eina greining frá skipaeftirlitinum.

Fyri at kunna reka bátin má hann setast á fíggjarætlan kommununnar, m.a. fyri at kunna rinda viðlíkahald, olju, legugjald, tryggingargjald og bedingseftirlit eina ferð um árið.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa bátin fyri kr. 700.000, treytað av at tekniska metingin og greiningin frá skipaeftirlitinum eru nøktandi

Eisini verður mælt til at játta neyðuga peningin til raksturin

Mælt verður eisini til, at stovna eitt felag, líknandi sluppvinafelagnum, at taka sær av dagliga rakstrinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa dekksbátin Fram.

Samtykt at játtað kr 800.000 av konto 20910 til keypið og raksturin av bátinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 8. september 2011:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atvøðu: Rúni Djurhuus og Jákup Símun Simonsen.

**Ískoyti.**
Báturin er skrásettur í skipaskránni sum stuttleikabátur og kann ikki brúkast til vinnu.

Higartil hava Regin Torkilsson og Finnur Ludvig saman við pápa og pápabeiggjum hjá Regini tikið sær av bátinum.

Báturin hevur verið brúktur í jólamánaðinum og hevur verið við á tveimum stevnum. Millum annað í regattasiglingini fyri træskip. Harumframt hevur báturin veri opin fyri almenninginum á ólavsøku.

NámX (Evald Rasmussen) hevur ætlanir um at nýta bátin til fiskibreytina.

Um hetta skal gerast veruleiki, er neyðugt, at báturin verður góðkendur til brúkið. Kannað verður í løtuni hjá Skipasýninum, hvørji krøv verða, og kann eisini væntast, at íløgur skulu gerast í bátin.

Tað er tí trupult at áseta hvussu nógvur peningur skal til fyri at kunna reka bátin, tí tað veldst um, hvussu nógv báturin verður brúktur, og eisini til hvørjar ábøtur skulu gerast.

Rakstrarútreiðslurnar í 2012 vóru um kr. 60.000,00.

Eingin inntøka er til bátin, men hann fekk stuðul í 2012 frá Regattasiglingini.

Um NámX skal brúka bátin, verður talan um øktar útreiðslur til olju – íløgur, trygdarútgerð o.s.fr.

Enn er eingin niðurstøða gjørd hesum viðvíkjandi, men neyðugt er við eini rakstrarfígging undir øllum umstøðum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at flyta kr. 75.000,00 til rakstur og íløgur av deksbátinum Fram av konto 20910 til konto 5366, og annars at taka hædd fyri deksbátinum Fram í fíggjarætlanini 2014.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**82/13** **<u>2013-0588</u>**

**<u>Bátadráttur í Álakeri</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tað hevur í nógv ár verið eitt ynski frá báteigarum, at tað var møguligt at taka bátar upp eftir einum bátadrátti í Tórshavn.
Tað er bátadráttur í bátahylinum á Argjum, men hesin er ikki egnaður til størri bátar
Í Tórshavn og á Argjum eru umleið 500 bátar, og um størri bátar skulu upp á land í kommununi, máa teir hivast við kranabili.

Um drátturin skal vera í Tórshavn, er Álaker helst rætta staðið.

Mettur kostnaður er umleið 1- 1,5 mió, alt eftir staðseting og stødd.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt at gera byggiprogram.

**Vinnunevndin 25. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

- Byggiprogrammið sigur m.a. at drátturin skal býtast í tvey, onnur hálvan er til smærri bátar og hin til størri bátar.

Drátturin til smærru bátarnar er 4 m breiður, har hallið er 1:4, og kemur út á 2 m dýpi.
Drátturin til størru bátarnar er 7 m breiður , har hallið er 1:6,5, og kemur út á 7 m dýpi.

Fyri at fáa tað neyðugu kyrruna, er neyðugt at gera eitt 30 m grótkast, við eini hædd upp á 3 m yvir sjóvarmálanum.

Tann samlaði kostnaðurin er mettur til 1,75 mió, íroknað mvg.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at játta tkr. 1,75 til arbeiðið, at fíggja av kto. nr. 7476. Umsitingin bjóðar arbeiðið út og setur ætlanina í verk, treytað av at samlaði kostnaðurin ikki er hægri enn mett, annars má málið leggjast aftur fyri nevnd til støðutakan.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Samtykt og at beina málið í fíggjarnevndina. Íløgukonto nr 7476 smábátahavnir.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Borgarstjórin luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**83/13** **<u>2013-1025</u>**

**<u>Keyp av hølum til Tórshavnar kvøld- ungdóms- og listaskúla</u>**

Mentamálaráðið hevur sett bygningarnar hjá Sjónvarpinum í Vørðsluni/M.A. Winthers gøtu til sølu. Samskifti hevur verið við Mentamálaráðið um møguleikarnar at keypa ovaru bygningarnar, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a, í alt 551 m², til Kvøldskúlan, sum heldur til hinumegin vegin í Vørðsluni. Við hesum fær Kvøldskúlin savnað og vaksið munandi um virksemismøguleikarnar í Vørðsluni bæði við skúlastovum og verkstovum. Bygningarnir tørva ábøtur, og ávísar umvælingar og umbyggingar skulu gerast til kvøldskúlavirksemið.

Mett verður, at bygningarnir kunnu fáast til keyps fyri kr. 2,5 mió.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa bygningarnar fyri í mesta lagi kr. 2,5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla býráðnum til at keypa allar tríggjar ognirnar og at fíggja keypið av kto. 6175, L61010 keyp av bygningum.

**Fíggjarnevndin 2. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 2. mai 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Býráðið 2. mai 2013:** Kunnað varð um, at býráðið á fundi fyri læstum hurðum hevur samtykt, at keypa allar tríggjar ognirnar.

**84/13** **2013-1001**

**Framfluttar játtanir**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at roknskapurin fyri 2012 verður gjørdur upp, verður eisini gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2013.

Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Yvirlitið saman við ynsktum broytingum verður lagt fram saman við fyribils roknskapinum fyri 2012.

| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**2. mai 2013** | Blað nr.: **10499**<br>Formansins merki: |

| | Flytast av | | | Flytast til | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Trivnaðarnevndin:** | | | | |
| 2101 | Naina | 38.000 | 2613 | Børn sett heiman... | 2.266.000 |
| 2744 | Døgurðaskipan fyri... | 90.000 | 2745 | Tiltøk á eldraøkinum | 30.000 |
| 2716 | Gjald fyri pláss í... | 65.000 | | | |
| 2102 | lagt úr fyri..... | 102.000 | | | |
| 2617 | Brúkaragjald.... | 62.000 | | | |
| 2610 | Barnaverndarnevnd | 78.000 | | | |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | 100.000 | | | |
| 2612 | Barnavernd | 495.000 | | | |
| 2310 | Barnatannrøktin | 1.266.000 | | | |
| | **Tilsamans** | **2.296.000** | | **Tilsamans** | **2.296.000** |
| | **Mentamálanevndin:** | | | | |
| 5210 | Kvøldskúlin | 490.000 | 4112 | Nólsoyar skúli | 90.000 |
| | | | 4113 | Velbastaðar skúli | 400.000 |
| | **Tilsamans** | **490.000** | | | **490.000** |
| | **Tekniska nevnd:** | | | | |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 750.000 | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | 750.000 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | 460.000 | 6710 | Vatnveiting | 460.000 |
| | **Tilsamans** | **1.210.000** | | | **1.210.000** |

Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til hesar broytingar.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. 33.311 netto, til rakstur og t.kr. 142.968, netto, til íløgur. Umframt at taka undir við tilmælinum um broyting.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013**: Samtykt við 1. viðgerð at taka undir við tilmælinum og umframt hetta at flyta 300.000 kr. av konto 1560 til 1210 og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**85/13** **2013-1010**

**Leigusáttmáli við Føroya Landsstýrið um lendi undir bygningum á Gróðurstøðini í Hoydølum**

Bygningarnir á gróðurstøðini eru lidnir og verða í næstum tiknir alment í nýtslu.

Fyri at bygningarnir kunnu skrásetast rætt er neyðugt, at serligur leigusáttmáli verður gjørdur fyri lendi undir bygningunum.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevnin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Marin Katrina Frýdal var ikki við til viðgerðina av málinum.

Einmælt samtykt.

**86/13** **2012-1580 BH**

**Umsókn frá SMS um avtalu viðv. viðlíkahald av Húsagøtu (vísast skal eisini til j. nr. 2012-1580 og 2006-2832).**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Á fundi 27. juni 2012 við umboð fyri SMS hjá borgarstjóranum var støðan viðv. viðlíkahaldinum av vegastrekkinum millum Húsagøtu og Tinghúsvegin umrøtt. Hetta tí tað í sambandi við umbyggingina av parkeringskjallaranum við SMS í áttati árunum var avtalað millum kommununa og SMS, at tað framhaldandi skuldi vera vegasamband millum R.C. Effersøes gøtu og Tinghúsvegin. Tað finnast ikki skjøl, sum staðfesta smálutirnar í avtaluni, og í hesum sambandi hava umboðini ynskt at kommunan átekur sær viðlíkahaldið av einum parti av vegastrekkinum. Talan er um uml. 1050 fermetrar, sum kommunan skal átaka sær at útvega fígging av asfaltering, soleiðis at SMS kemur at standa fyri arbeiðinum. Vegastrekkið kemur sosatt undir kommunala ogn og verður fevnt um vanligt viðlíkahaldsarbeiði so sum gøtusóping og vetrartænasta. Eftir sum ein partur av vegastrekkinum er á einum parkerings-dekki, skal tað tilskilast í avtaluni, at kommunan bert tekur sær

av uppgávum omaná dekkinum, tvs ikki í sjálvari konstruktiónini (so sum veitingararbeiði v.m).

Samstundis sum farið verður at gera matrikulerar broytingar á økinum, er neyðugt at ruddað verður upp í matrikuleru viðurskiftunum. Umsitingin hevur í hesum sambandi gjørt notat í málinum (sí j. nr. 2012-1580-2). Greitt verður annars frá hesum á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingin at gera avtalu við SMS, sum tekur støði í at kommunan átekur sær at fíggja asfaltering og at kommunan sostatt yvirtekur vanligt rakstrararbeiði av vegastekkinum.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Bogi Andreasen var ikki við til hetta málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til avtalu við SMS. Avtalan tekur støði í at kommunan átekur sær vanligt viðlíkahald av vegaøkinum millum Húsagøtu og Tinghúsvegin. Harumframt fevnir avtalan um at kommunan veitir fígging til asfaltering av sama strekki, tá ið arbeiðið er gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við framlagda uppskotinum (2012-1580/6) og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.
Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Bogi Andreasen varð ikki við til viðgerðina av málinum.

Einmælt samtykt.

**87/13** **2013-1022**

**Berjabrekka 3**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nevndin fyri sjálvsognarstovnin Berjabrekka 3, hevur á nevndar fundi 3. apríl 2013 samtykt at avvikla sjálvsognarstovnin og at afturgjalda stovnarunum peningin.

Roknskapurin verður uppgjørdur í løtuni, men mett verður at Tórshavnar kommuna fær uml. 1.8 mió kr. afturgoldnar. Víðari samskifti í málinum fer fram millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Tikið til eftirtektar.

Borgarstjórin luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**88/13** **2007-1290 MJA**

**Útstykking – Djúpagil – Millum Gilja**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Útstykking í økinum, har Djúpagil møtir nýggja sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin.

Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring til skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.

Útstykkingin vil halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meira saman.

Økið kann íalt hýsa 30 nýggj grundøki við møguliga einum øki til stovnsbygging eystanfyri. Hetta síðsta vil tó helst krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 500.000,- kr. verða settar av til projektering og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 7. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Hon heitti samstundis á umsitingina at fyrireika útstykkingina soleiðis, at stykkini verða seld liðugt planeraðið. Kunnað var um at talan er um eina útstykking við 300 fermetra stykkjum við felags parkeringsplássum, gøtusambondum og skipaðum fríøkjum. Nettonýtslustigið verður 0,4.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2007:** Samtykt at leggja kr. 500.000,- út til projektering og leggja málið fyri býráðið.

**Býráðið 24. mai 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útstykkingarætlan við uml. 35 grundstykkjum á 300 fermetrar og 2 felagsøkjum. Útstykkingin hevur atgongd frá sambindingarvegnum við nýggja innkomuvegin og er skipað í 4 bólkar fram við einum atkomuvegi. Atkomuvegurin hevur gongubreyt báðumegin.

Norðan fyri atkomuvegin er avsett pláss til 1 eyka parkeringspláss pr. matrikul. Innkoyringarnar til bústaðarbólkarnar eru markeraðar við vegbungum. Gøtusamband er til Stórutjørn gjøgnum ein tunnil undir sambindingarvegnum.

Grundstykkini liggja fram við 8 m breiðum vegum uttan kantsteinar. Vatnrennur úr beton er mark millum gongubreyt og koyribreyt. Koyribreytin er 4 m breið.

Ætlanin er at lata liðugt planerað grundstykkir við ásettum byggifelti og planeringshædd.

Gongugøtur eru millum bústaðareindirnar og felagsøkir. Gøturnar hava samband við verandi gøtuskipan.

Ætlanin er at bjóða útstykkingina út millum 5 ráðgevarar til projektering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna ætlanina og at projekteringin av útstykkingini verður boðið út millum 5 ráðgevaravirkir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við støðutakanina til víðari projektering av ústykkingarætlanini, skal støða takast til atkomuviðurskifti til rørslutarnað, gongu- og súkklubreyt og reinskan av vegvatni. Vìst verður í hesum sambandi til mál nr. 2005-1436: Mál

um súkklubreytir og atkomurviðurskiftini hjá rørslutarnaðum og mál nr. 2005-1437: Mál um yvirflatuvatntrupulleikar í kommununi.

Greitt verður frá útstykkingarætlanini.

**Tekniska nevnd 18. september 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum, men ynskir at umsitingin kemur við einum betri uppskoti um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Plan-og rakstrardeildin hevur viðgjørt spurningin um hvussu atkomuviðurskiftini til útstykkingina verða loyst. Víst verður til TK j. nr. 2011-2473/skjalamappur 1-4.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til útstykkingarætlan - uppskot nr. 4 (j. nr. 2011-2473/4), tó við teirri broyting, at íbindingin verður yvir av framtíðar íbinding til Stórutjørn og at vegamótið verður skipað soleiðis, at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Ferðslunevndin 1. november 2011:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum og beinir málið í teknisku nevnd til støðutakan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðaran á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við ferðslunevndini og at beina endaligu loysnina og tær broytingar, tær viðføra av útstykkingarætlanini, til byggi- og býarskipanarnevndina til góðkenningar.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen, Jan Christiansen og Annfinn Brekkstein, ynskir at umsitingin kemur við alternativum uppskotum við kostnaðarmetingum, at leggja fyri nevndina aftur.

Ein minniluti, Levi Mørk, tekur undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna krøv frá teknisku deild um broyting av atkomuviðurskiftunum í mun til upprunauppskotið (2007-1290/6), hevur umsitingin tillagað upprunauppskotið (sí skjal2007-1290/20,3). Afturat eru gjørd 2 alternativuppskot (sí skjøl 2007-1290/20,1 og 2).

Hjálagt eru yvirlit yvir veglongdir, tal av grundstykkjum og samlað grundøki.

**Tilmæli:**
Tekniska stjórin og býararkitektin mæla til:
1. At góðkenna uppskotið til útstykkingaætlan.
2. At góðkenna vegføring og íbinding treytað av góðkenning í tekniska nevnd.
3. At umsitingin ger uppskot til serstaka byggisamtykt við m.a. áseting av byggifeltum, byggilinjur o.a. at leggja fyrri nevnd.
4. At heimilda umsitingin at útvega skitsuupskot við kostnaðmeting fyri liðugt planeraði stykkir.
5. At jatta upp til 400.000kr.til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar.

Halla Samuelsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera alternativ uppskot við fyribils kostnaðarmetingum sambært samtykt í teknisku nevnd frá 8. november 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka undir við alternativa uppskoti nr. 1, dagf. 14.11.11, j.nr. 2007-1290/20 (1 av 3). Samstundis verður mælt til at møguleiki er at avskipa ferðsutrýstið við ljósregulering, tá hetta einaferð gerst aktuelt í sambandi við framtíðar ferðslu til og frá økinum við Stórutjørn.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta 400.000 kr. av konto 6175 til at gera skitsuupskot, kostnaðameting og visualiseringar og beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av projektuppskoti út millum 4 ráðgevarafyritøkur. Sí útbjóðingarskjal TK j.nr.2012-0564/10. 3 tilboð er komin inn. Sí hjálagt skjal lisitatiónsprotokol TK j.nr 2012-0739.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við lægsta tilboðnum frá Landsbyggifelagnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Landsbyggifelagnum, sum hevði lægsta boðið áljóðandi kr. 96.875,- uttan mvg.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Kunnað var um málið. og at málið verður viðgjørt á komandi fundi.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Landsbyggifelagið hevur latið projektuppskot til útstykkingina. Uppskotið er projektgranskað í teknisku deild og í byggideildini (sí viðmerkingar j.nr.2012-2495/2). Ymiskar avbjóðingar eru í mun til verandi uppskot.

Økið har útstykkingin liggur, sambært verandi projektuppskoti, er ójavnt og hevur lutfalsliga stórt hall. Royndargravingar vísa eisini at tað í støðum er nógv áskot, sum skal koyrast burtur.
Hetta merkir, at munandi nøgdir av tilfari skulu flytast til á ávísum vegastrekkjum og nøkrum av merktu grundstykkjunum.

**Vegur nr. 2.**
Økið har tann norðasti vegurin (vegur 2) er rímiliga slætt. Her kunnu grundstykkini leggjast fram við vegnum uttan størri uppfylling. Tó er neyðugt at spreingja fyri teimum grundstykkjunum, sum liggja tættast við høvuðsvegin “Klingran”. Hetta kann geva trupulleikar orsakað av stuttu frástøðuni til vegin.

**Vegur nr. 3.**
Fyri at fremja veg nr. 3, er neyðugt við munandi uppfylling – upp til 5 m. Hetta viðførir at grundstykkini sunnan fyri vegin eisini skulu fyllast samsvarandi upp treytað av, at planeringshæddin fyri grundstykkingini liggur 2 m undir vegkotu. Hetta ber við sær langar skráar oman til verandi lendi.

**Vegur nr. 1.**
Til veg nr. 1 er ikki neyðugt við nógvari regulering av lendinum, men í sambandi við planering av grundstykkjum eystan fyri vegin, er neyðugt við munandi uppfylling, fyri at hesi stykkini skulu verða passandi til vegin. Hallið á vegnum er 100 promillu, sum er eitt sindur meira enn tey 80 promillini, ið vit vanliga miða

ímóti. Avleiðingin av einum minni halli vildi verði størri nøgdir av tilfari á veg nr. 1 og veg nr. 3. (sí viðmerkingar j.nr.2012-2495/1).

Umframt tær stóru uppfyllingarnar sambært verandi projekti, er tað neyðugt at stoypa stuðlamúrar ímillum grundstykkini, sum hava størst hæddarmun og ímóti vegnum, har planeringshæddin liggur munandi lægri enn vegkotan. Eingin kostnaðarmeting er gjørd av hesum arbeiðinum.

Sambært verandi projektuppskotið er gjørd ein kostnaðarmeting, sum gevur ein kvadratmeturprís upp á uml. kr. 1.600 ella uml. kr. 500.000 pr. grundstykki. Her er stuðlamúrarnir ikki íroknaðir.

Sambært hesum uppskotinum eru øll grundstykkini liðugt planeraðið. Tað er ikki mett ráðiligt at selja grundstykkini óplaneraðið , har hvør einstakur keypari sjálvur stendur fyri at grava út og planera sítt egna stykki. Hetta er tí, at stykkini bert eru 300 $m^2$ og tær stóru uppfyllingarnar gera tað neyðugt at byggja stuðlamúrar.

Eisini er neyðugt at gera eina serstaka byggisamtykt við skipan av bygging á økinum.
Umsitingin er í gongd við at gera eitt alternativt uppskot til útstykkingina, grundað á uppskotinum verandi uppskot, við eitt sindur færri grundstykkjum (millum 20 og 22 stykkir), fyri at sleppa undan so stórum uppfyllingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at býarskipanardeildin arbeiðir víðari við alternativa at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina aftur til endaliga góðkenning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til broyting av fyriliggjandi projektuppskoti.
Vísandi til ískoyti frá fundinum í byggi og býarskipanarnevndin 04.12.2012, hevur endamálið við uppskotinum verið at:
- veghallið ikki fer uppum 80 promillu.
- minka um nøgdina av stuðlamúrum
- minka um uppfylling av lendinum.

Avleiðingin av hesum er:
- talið av grundstykkjum er minkað frá 30 til 24.
- Støddin á grundstykkjunum er í miðal hækkað frá 305 $m^2$ til umleið 328 $m^2$.
- Veglongdin er minkað frá 388 m (4 vegir) niður í 250 m (1 vegur)
- Fermeturprísurin verður mettur at minka frá uml.1.500 kr. til 1.200 kr.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til at taka undir við uppskotinum og at heimila umsitingini at biðja um tilboð frá ráðgevum og gera ráðgevarasáttmála uppá at gera útbjóðingartilfar og kostnaðameting til útstykkingina.

**Tekniska nevnd 6. februar 2013:** Útsett til næsta fund.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Marin Katrina Frýdal og Helena Dam á Neystabø, samtykti at fara á ástaðarfund.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 10. apríl 2013:** Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Marin Katrina Frýdal vóru, saman við umsitingini, á ástaðarfundi.

Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 150.000 kr. afturat av framfluttum løgukarmum fyri 2012, konto 8175 til at gera ráðgevarasáttmála og útbjóðingartilfar.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 21:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |